

BAKKAFROST

ESTABLISHED 1968

# SUNT LÍV

## FRÁGREIÐING UM BURÐARDYGD 2018

www.bakkafrost.com/sustainability



# Innihald


| | |
|---|---|
| Um Bakkafrost | 4 |
| Ferð okkara í burðardygd | 5 |
| 2018 afturlit við Regini Jacobsen | 6 |
| Sunt Lív ætlanin | 8 |
| Bakkafrost og ST málini fyri burðardyggari menning | 9 |
| **Sunn vinna** Frásøgn um avrik | 10 |
| Frá burturkasti til varandi orku | 13 |
| **Sunn fólk** Frásøgn um avrik | 14 |
| Íløgur í okkara fólk | 17 |
| **Sunnur laksur** Frásøgn um avrik | 18 |
| Føroyskur frá byrjan til enda | 23 |
| **Sunt umhvørvi** Frásøgn um avrik | 24 |
| Loysa okkara vøkstur frá árini á umhvørvið | 30 |
| **Sunn samfeløg** Frásøgn um avrik | 31 |
| Ein tilsøgn um at stuðla natúrligu verð okkara | 34 |
| Um frásøgnina | 35 |
| Týðandi evnir í burðardygd | 36 |
| Luttøka hjá áhugapørtum | 37 |


## HVAT ER Í HESARI FRÁSØGNINI

Hetta er onnur frásøgnin hjá Bakkafrost um burðardygd. Skjalið gevur eitt yvirlit yvir avrik mótvegis tvey ára Sunt Lív ætlanini fyri burðardygd fyri tíðarskeiðið frá 1. januar til 31. desember 2018. Sum størsti laksaalari í Føroyum eru vit greið yvir ábyrgd okkara at vera gjøgnumskygd viðvíkjandi árinunum, sum vit hava á staðbundna búskapin, samfelagið og umhvørvið. Nú ætlanin er eitt ára gomul, eru vit avgjørdari enn nakrantíð um at økja ferðina á framstigunum og handfaringina av hesum árinunum. Tilfar frá Bakkafrost UK og Bakkafrost US, sum eru minni enn 5% av rakstrarkostnaðinum og umsetninginum, er ikki við, men dótturfelagið Havsbrún er við í frásøgnini.

Fá meira at vita á
**www.bakkafrost.com/sustainability**




# Um Bakkafrost

**BAKKAFROST** stovnað í 1968 av brøðrunum Hans og Róland Jacobsen
**Bústaður:** Føroyar
**Høvuðssæti:** Glyvrar, Eysturoy
**Framleiðsla og beinleiðis søla til fyritøkur:** laksur, styroporkassar, fiskamjøl, lýsi og alifóður
**Longstu samfeldu virðisketuna í vinnuni:** Dótturfeløg (100% ognarlutur): Havsbrún, Fuglafjørður (mjøl, lýsi og fóður); Bakkafrost UK, Grimsby (innflytari og veitari av fiskavørum); Bakkafrost USA, New Jersey (framleiðari, innflytari og veitari av fiskavørum); Förka, Tórshavn (biogassvirki)
**Skrásett:** á keypsskálanum í Oslo (Oslo Børs) við eyðmerkingini BAKKA
**Starvsfólk:** 1.032 (svarar til 783 fulltíðarstørv), íroknað 99 á Havsbrún. Herumframt starvast 5 á Bakkafrost UK og 36 á Bakkafrost USA
**Marknaðarsøla:** USA (20%), ES (31%), Eysturevropa (25%), Asia (24%)

**Týðandi tilfeingi**

- Vit fíggja virksemið við tøkum gjaldføri og eginpeningi
- Vit líta á serkunnleikan, førleikarnar og virðini hjá okkara starvsfólki til at reka fyritøkuna og føra hana fram á leið, sum vit vaksa og mennast
- Vit eru bundin av eini røð av natúrligum tilfeingi, sum ger tað møguligt at framleiða fyrsta floks laks í heimsflokki
- Vit nýta framkomnasta framleiðsluútbúnað og tænastuskip, so virksemið er so effektivt og hóskandi sum gjørligt
- Vit hava fyrimun av góðu umrøðuni, sum vit fáa fyri okkara fyrsta floks laks og alifóður. Hetta ger tað møguligt at vaksa um okkara marknaðarpart
- Vit eru bundin av góða sambandinum við okkara áhugapartar fyri at hava bestu umstøður at skapa virðir báðum pørtum at gagni

**Virðisketan**



| | FISKAMJØL | LÝSI | ALIFÓÐUR | LÍVFISKUR | SMOLTSTØÐIR | BIOGASS | ALING | FSV | KRYVJING | VIRÐISØKING | PAKKING | SØLA |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Framleiðsla:** | Framleiðsluorka: 450 tons um dagin | Framleiðsluorka: 300 tons um dagin | Framleiðsluorka: 700 tons um dagin | Føroyska lívfiskaætlanin yvirtikin í 2018 | Framleiðsluorka: 14 mió smolt um árið Nýggj smoltstøð á Strond | Framleiðsluorka: 90-100.000 tons av burturkasti umgjørd um árið Væntandi í 2020 | 19 aliøkir í nýtslu á 17 firðum Nýtt aliøki í Hvalba í 2019 | 6 tænastuskip til aling (íroknað 4 før til livandi fisk) og 74 alibátar | Tøka í 2018: 44.600 tons í kruvdari vekt Kryvjiorka: 130.000 tons um árið Broytt tøkuhátt Gjørt íløgu í nýtt kryvjivirki | Framleiðsluorka: 40.000 tons av virðisøktum vørum um árið | Framleiðsluorka: Kassar til 70.000 tons av laksi um árið | Nettosøla í 2018: 3,2 mia kr. Selt til 29 lond |

**Virðisskapan**

- Vit skapa virðir til okkara partaeigarar og til Føroyar við skattum og beinleiðis og óbeinleiðis starvsmøguleikum
- Vit nøkta vaksandi altjóða eftirspurningin eftir proteinum við heilsugóðum og munadygt framleiddum laksaúrdráttum
- Vit geva okkara íkast til betri undirstøðukervi í Føroyum
- Vit virka saman við havbúnaðarvinnuni til at fremja ábyrgarfullar og burðardyggar siðvenjur

(Ársfrásøgnin og fíggjarligu úrslitini hjá samtakinum síggjast á www.bakkafrost.com)

**Serstøðan hjá Bakkafrost**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Høgt proteininnihald frá staðbundnum sjófeingi, burðardygg rávøra uttan viðgerð við hormonum | Betri lívfrøðilig trygd | Reint aliumhvørvi, munadyggar ringrás loysnir, einki antibiotika og ongar vakstrarhormonir | Stutt flutningstíð hjá laksi orsakað av stuttari fjarstøðu | Munadyggir framleiðslumøguleikar og vørumenning | Góð marknaðar-atgongd |

# Ferð okkara í burðardygd

**Tátíð**

**2003**
Føroyska veterinerskipanin varð sett í verk, minkaði um fellið

**2010**
Havsbrún varð fyrsta fóðurvirki, ið fekk GLOBAL G.A.P. góðkenning

**2013**
Bakkafrost varð ein av stovnarunum av Global Salmon Initiative

**2015**
Bakkafrost varð fyrsta føroyska fyritøkan, ið fekk ASC Chain of Custody góðkenning

**2017**
Mjøl- og lýsideildin fekk MSC Chain of Custody góðkenning

**2018**

**MARS**




Sunt lív ætlanin fór av bakkastokki við fyrstu frásøgnini um burðardygd, so enn meira ferð varð sett á framstigini hjá Bakkafrost móti týðandi pørtum av burðardygd og betri gjøgnumskygni

**APRÍL**

Bakkafrost fráboðaði íløgu í eitt nýtt biogassvirki, sum skal umgera aliburturkast til varandi orku og tøð

**JUNI**

Bakkafrost skipaði fyri árliga ruddingardegnum av fjøruni saman við øðrum laksaalarum

**AUGUST**



Bakkafrost hátíðarhelt 50 ára føðingardag og fráboðaði ein 10 milliónа Sunt Lív grunn, saman við 3 ára samlagi við Fróðskaparsetur Føroya til at stuðla náttúruvísindi

**NOVEMBER**



Bakkafrost var liðugt við at útskifta allar nótir, ið vóru viðgjørdar við kopari, fyri at minka um árinið á umhvørvið á firðunum

**DESEMBER**



Bakkafrost nærum tvífaldaði ASC góðkend aliøkir, frá fýra til sjey í eitt ár, og teknaði seg til ST Global Compact

**Framtíð**

**2019**
Nýtt aliøki við bestu umstøðum fyri fiskaheilsu og -umsorgan undir virksemi í Suðuroynni

**2020**
Nýtt biogassvirki undir virksemi, og næsta stigið av Sunt Lív ætlanini verður fráboðað

**2021**
Nýtt tænastuskip til aling at stuðla stevnumiðinum fyri lívfrøðiligari trygd

**2022**
Nýggj smoltstøð í Suðuroynni og lívfiskastøð á Sandoynni fara undir virksemi og nýggj frálandaverkætlan at stuðla stevnumiðinum fyri lívfrøðiligari trygd

# 2018 afturlit við Regini Jacobsen, forstjóra á Bakkafrost



Regin Jacobsen, forstjóri

**LÍTANDI AFTUR Á 2018**

2018 var eitt týðandi ár fyri Bakkafrost. Í august vóru 50 ár liðin síðan pápi mín byrjaði fyritøkuna, og á mangan hátt nýttu vit hetta hátíðarhaldið sum ein varða at seta framtíðar kósina fyri fyritøkuna.

Vit fráboðaðu eina fimm ára íløguætlan á 3 milliardir krónur fyri at styrkja strategiina um at minka lívfrøðiliga váðan, økja virkisførið og skapa burðardyggan organiskan vøkstur (hetta verður kunngjørt nærri í 2019).

Sum part av vakstrarætlanini fráboðaðu vit í mai mánaði yvirtøkuna av North Landing, einum laksainnflytara í USA við høvuðsdenti á eystursíðuna. Nýggja dótturfelagið fer at geva okkum betri atgongd og betri førleikar at tæna kundunum á hesum leiðum.

Úrslitið í 2018 var ikki so gott sum árið fyri orsakað av truplum marknaðarumstøðum og marknaðaratgongd. Vit meta kortini, at nýggir sáttmálar fyri okkara virðisøktu vørur fara at javna hetta í 2019.

Vit fegnast kortini um framstigini innan vakstrarstrategiina, tí fyri at vera burðardygg, mugu vit hava neyvt eyga við mest týðandi váðunum og møguleikunum og halda fram við at verða stýrd av okkara virðum.

Ein onnur týdningarmikil hending var útgávan av fyrstu frásøgn okkara um burðardygd, sum gav áhugapørtum okkara ein greiðan boðskap um áherðsluna, sum vit leggja á at seta ein burðardyggan og ábyrgdarfullan hugburð til alivinnuna fremst á dagsskránna. Í tráð við útsagnirnar í nýggju EAT-Lancet Food Planet Health frásøgnini, at eta heilsugott og burðardygt innan 2050, mugu vit í alstóran mun skifta til munadyggari hættir av proteini. Hóast laksaaling er ein av munadyggastu keldunum til djóraprotein, er tað týdningarmikið, at altjóða framleiðslan verður økt á ein ábyrgdarfullan hátt. Hetta er okkara visión.

Fyrsta frásøgnin um burðardygd gav eitt yvirlit yvir eina tvey ára ætlan, sum var sniðgivin kring eina visión at gera tað møguligt hjá milliónum av fólkum at liva sunt orsakað av útvegan av heilsugóðum og føðsluríkum laksi.

Við hesi næstu frásøgnini fara vit eitt stig longri at gera frásøgn okkara í samsvari við altjóða Global Reporting Initiative standardirnar, sum vit vóna fer at betra góðskuna á frásøgnini enn meira og geva størri gjøgnumskygni um, hvussu vit arbeiða fram ímóti okkara visión.

**ØKIR VIÐ FRAMGONGD**

Eitt ár er farið, síðan við sjósettu Sunt Lív ætlanina. Tað frøddi



Hans Jacobsen, stovnari

okkum at koma við tvinnum fráboðanum fyrsta árið av ætlanini. Í apríl fráboðaðu vit eina íløgu á 100 mió kr. í eitt nýtt biogassvirki, sum væntandi fer undir framleiðslu í 2020. Síðan kom fráboðanin í august, ið fall saman við 50 ára føðingardegnum, at økja strategiska slagið av íløgum fyri umhvørvið við einum nýggjum markaðum grunni. Hesin 3-ára Sunt Lív grunnurin fer at miða ímóti at skapa samlag við fyritøkur og felagsskapir, sum fáast við týðandi mál, ið hava árin á samfeløg, sum vit virka í. Fyrsta samlagið er við Fróðskaparsetur Føroya og fer at stuðla náttúruvísindi við denti á aling.

Samstundis, sum vit hava gjørt stór framstig innan flestu av okkara tilsøgnum – til dømis at fáa seks aliøkir góðkend eftir altjóða ASC standardinum, standa vit framvegis yvir fyri fleiri avbjóðingum.

## ØKIR, IÐ KUNNU BETRAST

Vit høvdu eitt afturstig í september, tá ið vit skrásettu eitt felli á umleið 630 túsund fiskar á einum av okkara aliøkjum, har eitt eitrandi alguslag varð skrásett. Hetta hevur ávirkað fellislutfallið, sum hækkaði av fleiri orsøkum í 2018 og forðaði okkum í at náa málið at minka tað til 6%. Hetta verður eitt øki, sum vit koma at leggja dent á í 2019.

> Pápi mín plagdi at siga: **„Vit mugu mennast við hugburðinum at gera tað betur alla tíðina, um framgongdin skal verða burðardygg.“** Eftir øll hesi árini og allar broytingarnar, sum vit hava gjørt á vegnum, so stendur einki í stað – 2018 var einki undantak.
>
> **Regin Jacobsen,** forstjóri á Bakkafrost

Okkum tørvar eisini at seta enn meira ferð á framgongdina við at stýra árininum á firðirnar. Hetta eri eg sannførdur um, at vit fara at gera við ASC góðkenningum av aliøkjunum.

## LÆRDÓMAR Á LEIÐINI

Gjøgnum árini hava vit eyðmerkt økir, har vit kundu fingið ágóða av eyka tilfeingi at hjálpa okkum við at seta meira ferð á framstigini, økir so sum fiskaheilsa og vælferð og umhvørvislig stýring.

Vit standa ikki einsamøll yvir fyri avbjóðingunum í sambandi við vøkstrinum av aling. At samarbeiða um hesar avbjóðingar gjøgnum t.d. Global Salmon Initiative hevur verið av stórum týdningi á okkara ferð. Sum ein av stovnarunum av hesum átakinum hava vit verið før fyri at arbeitt saman um mál so sum burðardygt alifóður, lívfrøðitrygd og fiskalús og kunnað deilt upplýsingar, sum broyta vinnuna.

At luttaka meira á altjóða pallinum hevur eisini verið ein góður háttur at gjørt framstig við okkara strategi. Í 2018 vórðu vit partur av UN Global Compact, sum gav okkum atgongd til nýggj netverk, sum uttan iva fara at mynda týðandi part av okkara ferð, sum vit halda fram við at fáast við mál, ið koma á leiðina hjá fyritøkum kring allan heim.

At innføra burðardygd í okkara mentan er eisini altavgerandi, um vit skulu halda áfram at gera framstig. Í oktober hevði Cambridge Institute of Sustainability Leadership eitt serligt leiðslu útbúgvingarskeið fyri teimum 22 limunum í okkara nevnd og leiðslubólki.

Hetta fer at hjálpa okkum at tilrættisleggja okkara strategi út um ár 2020. Burðardygd var eisini evnið á okkara virkisdegi, har flestu starvsfólkini luttóku.

## 2019 ÚTLIT

Í 2019 fara vit at tilrættisleggja næsta stigið av ætlanini fyri burðardygd. Denturin her verður lagdur á at halda áfram at fella tað inn í samtaksstrategiina og íløguætlanirnar. Vit fara at endurmeta høvuðsmálini saman við okkara høvuðs áhugapørtum, serstakliga fyri at skilja øki, har mál eru vorðin týdningarmiklari t.d. pakkitilfar úr plasti.

Vit fara at hyggja at vísindi, sum vit menna nýggj mál fyri at nøkta altjóða tilsagnir á økjum so sum veðurlagsbroytingum. Vit eru eisini íðin eftir at halda fram við at virka tættari saman við restini av vinnusamfelagnum í Føroyum í 2019, sum tey eisini meta um sítt íkast til ST málini fyri burðardyggari menning.

Sum ein av størstu veitarunum til føroyska búskapin taka vit støðu okkara í álvara og fara at hyggja at mátum, hvussu vit kunnu geva okkara íkast til dagsskránna og vísa ábyrgdarfulla leiðslu. Hetta fevnir eisini um at styrkja luttøkuna hjá staðbundnum áhugapørtum á økir so sum framferðarhátt okkara til umhvørvisliga stýring av firðunum.

Eg vóni at tær dámar at lesa hesa dagføringina av Sunt Lív ætlanini. Um tú hevur okkurt íkast, vildi eg fegin hoyrt frá tær. Vinarliga send tað til reja@bakkafrost.com

# Sunt Lív ætlanin hjá Bakkafrost fyri burðardygd

Okkara missión er at framleiða heilsugóðan laks í heimsflokki. Vit eru sannførd um, at við at gera íløgur í heilsuna hjá okkara vinnu, okkara fólki, okkara laksi, umhvørvinum og samfeløgunum, har vit virka, fara vit at gera tað møguligt hjá milliónum av fólkum kring heimin at liva sunt. Ætlanin gevur eitt yvirlit yvir, at vit hava sett okkum fyri at økja gjøgnumskygnið og leggja dentin á, hvussu vit handfara mest týðandi uppgávurnar.

| | Sunn vinna | Sunn fólk | Sunnur laksur | Sunt umhvørvi | Sunn samfeløg |
|---|---|---|---|---|---|
| STRATEGISK RAÐFESTING | At vaksa effektivt og ábyrgdarfult | At styrkja menniskjaliga fæfeingið | At uppfylla og vera betri enn leiðandi standardir | At minka um árinið á umhvørvið | At skapa virðir og styrkja sambandið við samfelagið |
| 2020 TILSAGNIR | Eingi frávik Kundaframatal á 9 ella hægri av 10 møguligum<br>Gera íløgu í eitt nýtt biogassvirki | Endurnýggja starvsfólkaætlanina<br>Íverkseta áhugakanning fyri starvsfólk<br>Eingir deyðatilburðir | Varðveita høga Omega-3 støðið<br>Varðveita høgt kundanøgdsemi við góðskuna á framleiddu vørunum<br>Minka fellið á sjónum til 6%<br>Hava ASC góðkenning á øllum aliøkjum<br>Menna og innarbeiða viðgerðir uttan medisin enn meira<br>Eingir fiskar skulu sleppa úr ringunum | Útfóðringin skal gerast enn betri Halda áfram at skifta koparviðgjørdar nótir Innarbeiða eina burðardygga fóðurstrategi | Stovna ein nýggjan Sunt Lív grunn<br>Innarbeiða samband við áhugapartar<br>Seta nýggja samfelagsíløguætlan í verk |
| 2018 AVRIK Í MUN TIL TILSAGNIR (grønt / gult / reytt) | Eingi dømi um frávik (grønt)<br>Kundaframatal á 8,24 av 10 møguligum (gult)<br>Fráboðaðu ætlanirnar um at byggja fyrsta biogassvirkið í landinum (grønt) | Ætlanir at seta eina áhugakanning í verk fyri starvsfólk í 2019 (gult) | 2.4g pr 100g merkir Omega-3 støði (grønt)<br>97,3% av kundunum nøgdir, meira enn nøgdir ella sera nøgdir við góðskuna á framleiddu vørunum (grønt)<br>Fellið á sjónum 11,56% (reytt)<br>7 aliøkir ASC góðkend (grønt)<br>Fleiri rognkelsir og royndir við mekaniskari avlúsing (grønt)<br>Eingir fiskar sluppu úr ringunum (grønt) | Settu myndatól upp á 5 aliøkjum afturat fyri at betra útfóðringina (grønt)<br>Skiftu allar koparviðgjørdu nótirnar, ið eftir vóru (grønt)<br>Fóru undir arbeiðið við nýggjari virkisætlan fyri burðardygga fóðring (grønt) | Fráboðaðu ein 10 milliónа Sunt Lív grunn (grønt)<br>Mentu eina ætlan at styrkja luttøkuna hjá áhugapørtum (grønt)<br>Mentu og fóru undir at íverkseta eina nýggja virkisætlan fyri samfelagsíløgu (grønt) |
| 2019 FOKUS | Dagføra strategiina fyri virkisábyrgd<br>Innføra eina nýggja var-skógvaraskipan Halda fram við arbeiðinum at uppbyggja Bakkafrost vørumerkið<br>Fara undir at byggja biogassvirkið<br>Flyta nýskapandi tøkni til allar smoltstøðirnar | Seta áhugakanningina í verk<br>Endurnýggja starvsfólkaætlanina í samsvari við Sunt Lív ætlanina<br>Halda fram at menna leiðaravenjingina<br>Set átøk í verk at stuðla eini fjølbroyttari arbeiðsmegi | Minka um fellið við áhaldandi eftirliti<br>Økja um útsetingina av rognkelsum á øllum aliøkjum<br>Búgva 7 aliøkir afturat til ASC standard<br>Halda áfram við at økja um serútbúgvið fólk til alingina | Taka enn fleiri av ST Global Compact meginreglunum við í okkara virðisketu<br>Økja um innanhýsis tilfeingið fyri at gera framstig við framferðarhátti okkara til umhvørvisliga stýring<br>Melda okkum til Ocean Disclosure Project<br>Varðveita lágan fóðurfaktor<br>Betra eftirlitið við burturkasti og vatni og fráboðan<br>Seta almenn mál fyri minking av kolevni | Dagføra ætlanina fyri virkisábyrgd<br>Halda áfram at seta nýggju ætlanina fyri luttøku hjá áhugapørtum í verk<br>Gera eina eftirmeting um týðandi evni afturat<br>Økja íkastið til týðandi mál |
| SDG MÁL | SDG 2 Eingin hungur<br>SDG 7 Rímilig og rein orka<br>SDG 8 Sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur<br>SDG 9 Vinna, nýskapan, og undirstøðukervi | SDG 5 Javnstøða millum kyn<br>SDG 8 Sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur | SDG 2 Eingin hungur<br>SDG 6 Reint vatn og reinføri<br>SDG 14 Lív undir vatni<br>SDG 17 Samløg um málini | SDG 6 Reint vant og reinføri<br>SDG 7 Rímilig og rein orka<br>SDG 9 Vinna, nýskapan, og undirstøðukervi<br>SDG 12 Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla<br>SDG 13 Veðurlagsátøk<br>SDG 14 Lív undir vatni | SDG 8 Sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur<br>SDG 17 Samløg um málini |

# Bakkafrost og ST málini fyri burðardyggari menning

Sunt Lív ætlanin gevur eitt yvirlit yvir málini hjá Bakkafrost fyri burðardygd, og við at gera tað, so er okkara íkast farið av bakkastokki til 2030 ST málini fyri burðardyggari menning (SDG) sum eitt svar upp á størstu avbjóðingarnar, sum samfelagið stendur yvir fyri í dag. Hóast vit ikki hava ment ætlan okkara fyri burðardygd við at nýta hesi málini sum støði, hava vit sett okkum fyri at viðgera ávirkanina, sum vit kunnu hava á hesi málini. Niðanfyri sæst, hvussu vit hava mett um tey, sum tú kanst lesa meira um gjøgnum frásøgnina.

## Møguleiki fyri stórari jaligari ávirkan

**SDG 2 Eingin hungur**
Gera enda á hungri, tryggja, at matur er tøkur, bøta um føðsludygd og virka fyri burðardyggum landbúnaði.

Vit geva okkara íkast til mál 2.4 við at útvega eina munadygga og heilsugóða keldu av proteinum og alneyðugum feittsýrum til at føða eitt vaksandi fólkatal.

**SDG 8 Sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur**
At virka fyri varandi, inkluderandi og burðardyggum búskaparvøkstri, fullum og úrtøkugóðum virksemi og sømiligum arbeiði til øll

Vit geva okkara íkast til mál 8.1 gjøgnum okkara stóra íkast til føroyska búskapin; 8.5 við at skapa fulltíðar og virkin størv við javnsettum møguleikum sum størsti privati arbeiðsgevari í landinum; 8.7 gjøgnum strongu standardirnar, sum eru lýstir í sambandi við atburð og veitan av vørum; og 8.8 við at nýta arbeiðsstandardir gjøgnum alla virðisketuna (í samsvari við góðkenning frá triðjaparti).

## Møguleiki fyri avmarkaðari jaligari ávirkan

**SDG 5 Javnstøða millum kyn**
Fáa í lag javnstøðu millum kynini og máttmenna allar kvinnur og gentur

Vit geva okkara íkast til mál 5.5 við at tryggja javnbjóðis møguleikar fyri leiðslu á øllum stigum, har avgerðir verða tiknar í fyritøkuni.

**SDG 7 Burðardygg orka**
Tryggja, at øll fáa álítandi, burðardygga og tíðarhóskandi orku, sum øll hava ráð til

Vit fara at geva okkara íkast til mál 7.2 við at økja partin av endurvunnari orku í føroysku orkusamansetingini frá ætlaða biogassvirkinum; og 7.3 við at økja virkisførið í okkara virksemi.

**SDG 9 Vinna, nýskapan og undirstøðukervi**
Byggja sterk undirstøðukervi, virka fyri inkluderandi og burðardyggari ídnaðarmenning og eggja til nýhugsan

Vit geva okkara íkast til mál 9.4 við at betra og nútíðargera ognir í allari virðisketuni fyri at gera tær burðardyggari og við at geva okkara íkast til nýtt undirstøðukervi í Føroyum.

**SDG 14 Lív í havi**
Varðveita og nýta høvini, sjógv og sjófeingi á burðardyggan hátt.

Vit geva okkara íkast til mál 14.4 við bert at nýta rávøru úr sjónum, sum er góðkend sum burðardygg; og 14.1 við at stýra okkara árini á umhvørvið á firðunum.

**SDG 17 Samstarv um heimsmálini**
Styrkja amboðini at verkseta og stimbra Heimsfevnandi partalagið fyri burðardyggari menning

Vit geva okkara íkast til mál 17.16 gjøgnum samstarv og samlag við at menna og luta bestu virkisloysnirnar, ið snúgva seg um skipaðar avbjóðingar innan havbúnað.

## Ábyrgd fyri at linna møguliga neiliga ávirkan

**SDG 6 Reint vatn og reinføri**
Tryggja øllum, at vatn og reinførisviðurskifti eru í lagi og umsitin á burðardyggan hátt

Vit geva okkara íkast til mál 6.3 við at avmarka árinið av okkara virksemi á umhvørvið á firðunum; 6.4 við at økja virkisførið av vatni; og 6.6 við at av3marka framtíðar dálking frá landbúnaði við flótandi taðingarevni, sum verður framleitt á okkara biogassvirki.

**SDG 12 Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla**
Tryggja burðardygg nýtslu- og framleiðslumynstur.

Vit geva okkara íkast til mál 12.3 við at minka um matarspill; geva íkast til 12.2 við at fáa sum mest burtur úr natúrligum tilfeingi, sum verður nýtt í okkara fóðri; 12.5 við at nýta ringrás framferðarhátt á ymsum økjum í virðisketuni; og 12.6 við at økja gjøgnumskygnið um okkara avrik innan burðardygd.

**SDG 13 Veðurlagsátøk**
Sum skjótast seta í verk bráðneyðug átøk at berjast ímóti veðurlagsbroytingum og avleiðingum av teimum.

Vit fara at gera veðurlagsátøk í okkara fyritøku og virðisketu og minka um útlátið, sum stavar frá okkara egna virksemi í tráð við veðurlagsgransking.

Í 2019 fara vit at eftirmeta samtaksstrategiina, og í hesum sambandi fara vit at endurmeta møguliga íkastið til málini.

# Sunn vinna **Frágreiðing um avrik**

## STRATEGISK RAÐFESTING

- At vaksa effektivt og ábyrgdarfult

## 2020 TILSAGNIR

- At hava 0 frávik
- At hava eitt kundaframatal á 9 ella hægri av 10 møguligum
- At gera íløgu í eitt nýtt biogassvirki

## 2018 AVRIK Í MUN TIL TILSAGNIR

- 0 frávik ●
- Kundaframatal á 8,24 av 10 møguligum ●
- Fráboðaðu ætlanir um at byggja fyrsta biogassvirkið í landinum ●

## 2019 FOKUS

- Dagføra ætlanina fyri virkisábyrgd
- Innføra eina nýggja varskógvaraskipan
- Halda fram at uppbyggja Bakkafrost vørumerkið
- Fara undir at byggja biogassvirkið
- Flyta nýskapandi tøkni á allar smoltstøðirnar

## SDG MÁL

- SDG 2 Eingin hungur
- SDG 7 Rímilig og rein orka
- SDG 8 Sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur
- SDG 9 Vinna, nýskapan og undirstøðukervi

### HVÍ TAÐ HEVUR TÝDNING

Sambært útrokningum hjá GSI stóð havbúnaður fyri umleið 8% av djóraproteininum, sum heimsins borgarar ótu í 2018 (FAO SOFIA, 2018; FAO 2018). At vera við í kappingini í heimsins skjótast vaksandi matvinnu merkir, at vit mugu vera til reiðar at varðveita og enntá økja okkara marknaðarpart. At virka í einum so lítlum landi sum Føroyum avmarkar vøksturin av okkara virksemi nakað, og tí er umráðandi at vera so dugnalig sum gjørligt og vera nýskapandi alla tíðina, um vit skulu vaksa innan fyri skipaðu mørkini og fáa sum mest burturúr. Fyri at vaksa ábyrgdarfult og á burðardyggan hátt, mugu vit eisini tryggja okkum, at vit halda hátt ein fyrimyndarligan atburð, so vit gera meira enn at vera í samsvari á týðandi økjum, at vit altíð lurta eftir okkara kundum og halda áfram at varðveita góð altjóða sambond.

Í 2018 fall framleiðslan til í miðal 660.000 máltíðir um dagin. Selt varð til vinnukundar í 29 londum í fýra høvuðsmarknaðum: USA (20%), ES (31%), Eysturevropa (25%) og Asia (24%). Hesir vóru innflytarar, framleiðarar, stórhandlar og matstovuketur. Vit síggja, at brúkararnir í hesum marknaðum í alsamt størri mun seta krøv til góðsku og burðardygd av vøruni, ið teir keypa, so teir hava frið í sálini. Hetta sæst eisini í eini frágreiðing hjá Mintel um alheimsrákið í 2019 viðvíkjandi mati og drekka. Frágreiðingin sigur, at brúkarar framhaldandi fara at vænta meira av stevnuskráum um burðardygd frá feløgum fyri at koma nærri einum ringrás mat og drekka búskapi.

Vit mugu alsamt vísa okkara tilsøgn til at framleiða sunnan laks í heimsflokki á ábyrgdarfullan og burðardyggan hátt. Hetta ber í sær at halda fram við at økja gjøgnumskygnið og góðkenning frá triðjaparti fyri at tryggja burðardygdina og góðskuna av okkara framleiðslu. Hetta er partur av Sunt Lív ætlanini, sum nevndin stendur á odda fyri.

Gjøgnum økta útvegan av einum sunnum og munadyggum slagi av proteini, og okkara íløgu í nýhugsan og burðardygt undirstøðukervi og endurvunnar orkuloysnir, gera vit okkara til at røkka ST málum 2, 7, 8 og 9 fyri burðardyggari menning. Sí síðu 9 til nærri kunning.

Meira kunning um strategi felagsins at røkta eina sunna fyritøku er at finna í okkara ársfrásøgn.

### REGLUGERÐIR LANDSINS OG SAMSVAR

Tað er alt avgerandi fyri burðardyggan vøkstur, at staðbundin og altjóða krøv alsamt verða hildin. Aðalmálið hjá felagnum er at halda allar viðkomandi lógir og reglugerðir og ásetingar landsins, har vit virka, og vit hava ábyrgdina av, at okkara starvsfólk fylgja øllum standardum og avmarkingum, ið eru ásettar í lógum, reglugerðum og fyriskipanum. Vit stremba eftir at lúka og helst fara fram um ásetingar í øllum viðkomandi lógum; hetta merkir at vísa leiðslu í verki í málum bæði innanlands og á altjóða stigi.

Okkara fyritøka er sera bundin at føroyska náttúrutilfeinginum, og tí er samsvar, leiðsla og opinleiki um umhvørvismál av alstórum týdningi. Tá ið føroyski veterinerleisturin varð innførdur í 2003, vórðu fleiri nýggjar avmarkingar settar í verk at betra um eftirlitið við aliumhvørvinum. Vit samstarva við umhvørvismyndugleikarnar og lúka ásetingarnar í føroysku alilóggávuni, sum umfata framleiðsluna í øllum liðum

> „Tað er sera sjáldan, at tú møtir einum veitara, sum hyggur at øllum málum, sum ávirka vinnuna, sum tey virka í. Bakkafrost hevur eitt sera høgt støði viðvíkjandi djóravælferð og ábyrgdarfullari útvegan av rávøru, samstundis sum tey veita fyrstafloks laks. Vit eru sera fegin um at vera í samlagi við Bakkafrost."
>
> **James Fisher,** fiskakeypari hjá Harrods
> og **Ellie Hurford,** leiðandi tekniskur stjóri hjá Harrods

í virðisketuni. Aliloyvini eru undirgivin umhvørvisásetingum, sum stýra okkara hátti at minka um umhvørvisárinini. Men vit fara longri enn at vera í samsvari við ásetingarnar, við tað at vit av fríum vilja fara undir at vera í tráð við altjóða fyrisett mál (so sum ASC), fyri at vera við til at hækka støðið innan vinnuna sum heild á ávísum økjum innan burðardygd.

Vit hava eina áhaldandi tilsøgn um, at vit eingi frávik skulu hava.

**Í 2018:**

- Høvdu vit eingi dømi um frávik (hesum máli ætla vit eisini at røkka í 2019) og ongi sakarmál ímóti okkum.
- Fóru vit undir fyrireikingar at vera í samsvari við krøvini hjá General Data Protection Regulation. Vit miða eftir at vera búgvin at vera í samsvari við reglugerðirnar í 2019, áðrenn tíðarfreistina fyri Føroyar, sum er 2020.

## ETISK ATFERÐ

Fyrsta stigið í ætlan okkara um burðardygd er at tryggja, at vit framhaldandi fremja og varðveita góða vinnuatferð í øllum liðum í virðisketuni, sum samsvara við kjarnuvirðini og meg-




Harrods, London

inreglurnar hjá Bakkafrost. Okkara virðir stýra okkara atferð og okkara framferð at skapa varandi virði fyri okkara kundar, partaeigarar og samfelagið. Fyri okkum merkir hetta at vera ábyrgdarful, vísa virðing, at vera íðin, effektiv og framsøkin.

Hesi virðini eru lýst í leiðreglum okkara fyri atferð, sum miða ímóti at skapa eina sunna virkismentan. Leiðreglurnar krevja, at øll starvsfólk skulu vísa fyrimyndarligan atburð í sínum virki og persónligan etikk í síni atferð, tá ið tey fremja sínar skyldur og ábyrgdir. Tey skulu nýta eina rættvísa og ærliga framferð í øllum samskifti við onnur starvsfólk og allar uttanhýsis áhugapartar.

Etisk atferð er meira enn bert at vera ein góður virkisborgari. Vit skulu eisini tryggja, at okkara veitarar lúka okkara standardir. Veitarar okkara verða bidnir um at halda seg til okkara krøv viðvíkjandi arbeiðsheilsu, trygd og trivnaði, mannarættindum, barnaarbeiði og umhvørvisstandardum, sum eru í tráð við ASC standardin.

Sí vegleiðing okkara fyri atferð á www.bakkafrost.com fyri at fáa fleiri upplýsingar um okkara leiðreglur móti mutri, pengatvátti og øðrum reglum fyri etiskari atferð, og hvussu vit eftirmeta okkara framferð til etiska atferð gjøgnum okkara leiðreglur.

Bakkafrost hevur gjørt tað gjørligt hjá almenninginum at kæra og gera vart við sína ónøgd á netinum um óetiska ella ólógliga atferð.

Hóast starvsfólk hava møguleika at gera vart við ymisk viðurskifti við at fylgja mannagongdum umvegis okkara HR deild, hava vit í 2019 ætlan um at byrja eina nýggja varskógvaraskipan, so starvsfólk fáa ein formligan hátt at gera vart við seg um ósømiliga atferð, ella um leiðreglurnar fyri atferð ikki verða virdar í samsvari við t.d. standardir fyri matvørutrygd.

**Í 2018 hava vit:**

- Dagført okkara leiðreglur viðvíkjandi virkisábyrgd, sum vit ætla at seta í verk í 2019.

## KUNDANØGDSEMI

At byggja upp langtíðar sambond við okkara kundar er umráðandi, um vit vilja varðveita okkara støðu sum ein veitari av laksi í heimsflokki, sum fólk velja fram um aðrar veitarar. Hetta inniber at lurta eftir teimum og nøkta broytandi tørv og standardir teirra. Ein av hættunum, vit gera hetta, er gjøgnum okkara árligu kundakanning, har vit geva øllum okkara kundum møguleika at koma við síni hugsan um mál so sum vørugóðsku, tænastu og pakkitilfar. Vit hava eisini givið kundunum møguleikan sjálvi at sæð okkara virksemi á okkara kundastevnu. Í tveir dagar vitja tey alla virðisketuna og fáa vitan um nógv ymisk mál, íroknað okkara góðsku og standardir fyri burðardygd.

Okkara framhaldandi mál er at tryggja okkum trúskap og álit frá okkara kundum við at geva eina framúrskarandi tænastu, sum er merkt av áliti, arbeiðssemi og ábyrgd. Meira kunning um okkara kundaætlan er at finna í okkara ársfrásøgn.

Sum vit vaksa og víðka okkara virksemi inn á nýggjar marknaðir – henda tilgongdin hevur gingið væl skjótari, síðan vit vórðu skrásett á keypsskálanum í Oslo – eru sølu- og kundatølini hækkað saman við framleiðsluni. Hóast vit hava megnað væl at nøkta broytandi ynski og krøv frá kundunum, millum annað við nýggjari vørumenning og at fáa góðkenning frá triðjaparti, slepst ikki undan, at vit møta onkrum avbjóðingum, og onkrar, sum vit ikki fáa gjørt nakað við (eitt nú altjóða viðurskifti). Men kortini hevur okkara tilsøgn um at varðveita varandi sambond givið okkum møguleikan at tikið okkum av teimum, har vit kunnu.

**Í 2018:**

- Byrjaðu vit at framleiða fesk fløk og portiónir sum úrslit av eftirspurningi frá kundum.
- Gjørdu vit kundakanningina aftur og fingu eitt kundaframatal á 8,24. Hóast vit fingu eina heldur lægri meting enn í fjør, góvu viðskiftafólkini okkum nú eina hægri meting á vørugóðsku og á okkara virðisøktu vørum.
- Tóku vit fleiri av kundum okkara við í ætlanir okkara um burðardygga fóðring og eftirmeting av pakningi.
- Vóru vit vertir fyri á leið 80 kundum í tveir dagar á okkara 50 ára føðingardegi við kundastevnu í Føroyum.
- Fingu vit eina frágreiðing um lívfrøðiligar trupulleikar við okkara laksaavskurði frá eftirlitsfólki úr Russlandi (hóast nærri kanningar ikki váttaðu nakrar trupulleikar). Hetta steðgaði atgongdina til russiska marknaðin fyribils.
- Fingu vit nógvar nýggjar kundar og gjørdu sáttmála við eina stóra sølumarknaðarketu, sum fer at økja um eftirspurningin eftir okkara virðisøktu vørum.
- Øktu vit um laksasøluna undir Bakkafrost vørumerkinum.

Í 2019 fara vit at halda fram við fokusið á vørumenning, sum kundarnir spyrja um, og fara at halda fram við at byggja Bakkafrost vørumerkið

## NÝHUGSAN

Havbúnaðarvinnan er framvegis lutfalsliga ung, og vøkstur hennara er framvegis tengdur at nýhugsan. At gera íløgur í nýhugsan, gransking og menning er av størsta týdningi, um vit skulu nøkta broytandi tørvin hjá kundunum, fáa fyrimunir av møguleikum og vera á odda á burðardyggan hátt.

Fimm-ára íløguætlanin hevur gjørt tað møguligt hjá okkum at gera stórar íløgur í nýggja tøkni, sum hevur hjálpt okkum at hava tamarhald á okkara váðum, so sum at viðgera laksalús uttan medisin og at nýta møguleikarnar, sum eru fyri vørumenning og vøkstri, so sum kringloysnir.

**Í 2018:**

- Fráboðaðu vit okkara ætlanir um at byggja eitt nýtt biogassvirki – okkara størsta íløga í ringrás búskap higartil (sí meira á síðu 13).
- Tóku vit fulla ábyrgd av ætlanini um at menna føroyska laksin (les meira á síðu 23).
- Hildu vit áfram við okkara gransking um at fáa sum best burtur úr góðskuna av fóðri og burðardygd.
- Byrjaðu vit framleiðslu á heimsins størstu smoltstøð á Strond, har vit nýta kringloysnir at fáa best møguliga umhvørvisstýring (les meira á síðu 30).
- Byrjaðu vit framleiðslu av laksalýsi og -mjøli. Virkið nýtir kollveltandi tøkni, sum koyrir við el og dampi, sum ger tað møguligt at minka stórliga um orkunýtsluna.

Í 2019 fara vit undir at byggja biogassvirkið og at flyta nýskapandi tøkni frá smoltstøðini á Strond til aðrar smoltstøðir.

## VIÐURSKIFTIR VIÐ UMHEIMIN

Føroyar hava góð viðurskiftir við umheimin. Men tað er kortini áhaldandi almennur áhugi fyri politikkinum hjá Bakkafrost viðvíkjandi grindadrápi. Vit hava strangar innanhýsis reglur, sum greitt krevja, at starvsfólk mugu ikki taka lut í arbeiðstíðini, og at okkara útgerð má ikki nýtast á nakran hátt. Havbúnaðarfelagið, har Bakkafrost er limur, hevur gjørt eina yvirlýsing við okkara støðu, sum er undirskrivað av stjórunum á øllum alifyritøkunum.

# Sunn vinna
# **Frá burturkasti til varandi orku**

Tað, ein tveitir burtur, kann verða fongur fyri ein annan. At hava ein ráðsnaran hugburð hevur eyðkent virkna vøksturin hjá Bakkafrost gjøgnum árini, og í 2018 varð hetta sligið fast við framsøknu íløguætlanini, tá ið Bakkafrost fráboðaði eina íløgu á 100 milliónir krónur til at byggja eitt nýtt biogassvirki í Føroyum.

Virkið fer at nýta spillúrdráttir frá alingini hjá Bakkafrost og annan fisk úr vinnuni og tøð frá landbúnaðinum til at framleiða varandi orku og tøð. Hetta fer fram við at niðurbróta organisk evni í lívfrøðiliga tilfeinginum til minni mýl gjøgnum anaerobiska sodning (sodning uttan ilt). Tá ið hendan tilgongdin er lokin, er lívfrøðiliga tilfeingið umgjørt til biogass, nevniliga karbon dioxide og metan (hetta seinna, sum verður brúkt til framleiðslu av varandi orku), og digestate (sum verður nýtt til taðingarevni).

Tá ið virkið er liðugt, er tað ført fyri at umgera upp til 90-100.000 tons um árið av øllum aliburturkasti, útvega hita til 400 húsarhald og streym til 1.900 húsarhald við verandi inntaki, verður mett. Hetta verður mett at spara 11.000 tons av $CO_2$ útláti (grundað á tilsvarandi avloysing av lívrunnari orku) um árið.



Umframt at framleiða varandi orku, fer virkið av framleiða 40-45.000 tons av natúrligum flótandi taðingarevni árliga, sum verður flutt aftur til bøndur í ymsu oyggjunum uttan kostnað. Hægri upptøkuførleikin hjá taðingarevninum fer væntandi at minka um útlátið á firðirnar.

Varandi orkan, ið verður framleidd, verður latin inn á landsnetið og fer at geva sítt íkast til føroyska málið at hava 100% av streymi frá varandi orkukeldum innan 2030. Hetta talið var 49% í 2018.

Biogassvirkið verður bygt í 2019 og fer væntandi undir virksemi í fyrsta ársfjórðingi 2020. Framsøkna íløguætlanin hjá Bakkafrost leggur dent á virknan vøkstur til at nøkta vaksandi eftirspurningin eftir proteinum, ið verða framleiddar burðardygt. Hetta umfatar framkomnar endurnýtsluloysnir so sum hesa, sum minka um burturkast, avmarka og sleppa undan $CO_2$ útláti og stimbra burðardygd gjøgnum aðrar vinnur. Hugburðurin hjá Bakkafrost higartil hevur fingið viðurkenning hjá altjóða leiðaraheiðursløn Edie's fyri burðardygd.

# Sunn fólk **Frágreiðing um avrik**

### STRATEGISK RAÐFESTING

- At styrkja menniskjaliga fæfeingið

### 2020 TILSAGNIR

- Endurnýggja strategiina fyri starvsfólk
- Seta eina áhugakanning hjá starvsfólki í verk
- Hava 0 deyðatilburðir

### 2018 AVRIK Í MUN TIL TILSAGNIR

- Ætlanir um at seta eina áhugakanning í verk hjá starvsfólki vórðu fluttar til 2019

### 2019 FOKUS

- Seta eina kanning í verk um áhuga hjá starvsfólki
- Endurnýggja strategiina fyri starvsfólk í tráð við Sunt Lív ætlanina
- Menna leiðaravenjingina enn meira
- Seta tiltøk í verk at stuðla eini fjølbroyttari arbeiðsmegi

### SDG MÁL

- SDG 5 Javnstøða millum kyn
- SDG 8 Sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur

**HVÍ TAÐ HEVUR TÝDNING**
At gera íløgur í menniskjaligt fæfeingið er grundleggjandi fyri eina sunna fyritøku. Vit ásanna, at skal vera gjørligt at fremja okkara visión og røkka okkara strategisku málum, mugu vit hava dugnalig og hugað starvsfólk, sum av heilum huga taka undir við okkara kjarnuvirðum.

Fyritøkan umfatar í dag eina sameining av alifyritøkum, sum yvir fleiri ár hava ment seg í Føroyum, ofta í bygdarsamfeløgum. Nýliga hava vit latið upp søluskrivstovur í Stórabretlandi og hava ognað okkum eina lítla fyritøku í USA. Tað má raðfestast høgt at fáa fólk integrerað í Bakkafrost sum fyritøku og í okkara mentan, um tað skal eydnast okkum at varðveita góðskustøði í heimsflokki, og um øll starvsfólk skulu virka eftir sama virðisgrundarlagi. Hetta merkir, at vit framhaldandi mugu laga okkum og vera opin fyri at læra nýggjar mátar, meðan vit halda áfram at vaksa og mennast saman við umhvørvinum uttanfyri.

Vit eru heppin at hava eina mentunarligt fjøltáttaða arbeiðsmegi í dag, og hetta gevur okkum ein serligan møguleika at styrkja um okkara menniskjaliga fæfeingi við at hava ein umfevnandi hugburð. Havbúnaðarvinnan inniber ofta likamliga krevjandi arbeiði, og tí er tryggjan av heilsu, tryggleika og trivnaði hjá starvsfólkunum raðfest ovast á listanum.

Við at skapa virðismiklar arbeiðsmøguleikar gera vit okkara til at røkka málunum 5 og 8 hjá ST um burðardygga menning. Sí meira kunning á síðu 9.

**MENNISKJALIGA FÆFEINGIÐ**
Vit hava samanlagt 1.032 fólk í starvi (svarandi til 783 fulltíðarstørv) í 24 kommunum í Føroyum. Okkara evni til at hava eitt fjøltáttað og fevnandi arbeiðspláss, at draga gávað og serútbúgvið fólk at sær og varðveita tey, at byggja eina arbeiðsmegi við førleika og at varðveita høga arbeiðsgleði er grundarlagið undir okkara HR bólki.

Okkara leiðreglur fyri atferð greiða frá okkara framferðarhátti at skapa so góðar arbeiðsumstøður sum gjørligt, harumframt okkara tilsøgn um at skapa eitt professionelt og jaligt arbeiðsumhvørvi, sum er umfevnandi, og ikki er merkt av mismuni.

Arbeiðsloysið í Føroyum er við sínum 1,9% eitt av heimsins lægstu. Í 2018 vóru 88% av føroyskum monnum í starvi, meðan talið var 84% hjá kvinnunum (kelda: Hagstova Føroya). 20% av nevndini vóru kvinnur, og 7% av leiðarunum vóru kvinnur.

Okkara leiðreglur fyri HR endurspegla okkara tilsøgn um at virða serkunnleikan og ískoytið frá øllum starvsfólkabólkum. Hetta merkir eisini, at vit gera tað gjørligt hjá starvsfólki at arbeiða longur enn eftirlønaraldur, um tey ikki ynskja at fara úr starvinum.

Partur av okkara starvsfólkaætlan er at draga ung, gávað starvsfólk at okkum. Vit taka lærlingar, starvsnæmingar og fólk úr fleiri ymiskum arbeiðsbólkum, íroknað marknaðarføring, fígging, havbúnað og havlívfrøði, umframt at vit veita næmingum úr skúlum í økinum arbeiðsroyndir. Vit hava eisini javnan vitjan av skúlaflokkum á okkara høvuðssæti og á okkara framleiðsluvirkjum.

Hvør ár luttaka vit á føroysku netverksstevnuni Jobmatch sum ein av høvuðsstuðlunum, har vit geva næmingum ein sýnisglugga inn í havbúnaðarheimin. Hetta hevur víst seg at vera ein sera góður háttur at fáa nýtt, gávað arbeiðsfólk og at stuðla undir viðkomandi útbúgvingum.



Gongutúrurin hjá Bakkafrost 2018

Bakkafrost bjóðar sínum starvsfólki marknarførandi fyrimunir. Hetta umfatar eina partabrævaskipan (sum 210 arbeiðsfólk vóru við í í 2018), bonuspartabrøv (sum stóð øllum starvsfólkum í boði) og ymiskar tryggingarmøguleikar, sum vórðu veittir starvsfólki í føstum starvi eftir tríggjar mánaðir í starvinum.

Okkara eftirlønar- og barsilsskipanir fylgja landsins lógum.

Vit skipa fyri ymiskum tiltøkum gjøgnum árið, har øll starvsfólk fáa høvi at hittast og fáa samsýning fyri sítt ískoyti til, at okkum gongst væl. Eitt av hesum tiltøkum er ein virkisdagur, har vit skifta orð um okkara raðfestingar og hoyra frá okkara kundum; ein árligur gongutúrur; og eitt árligt jólahald fyri øll starvsfólk og familjur teirra (í 2018 vóru 900 fólk til jólahaldið á Glyvrum og 150 í Suðuroy).

Talið av arbeiðstakarum í Føroyum er tað hægsta í Evropa samanborið við fólkatalið. Hetta hevur saman við góða umdøminum hjá Bakkafrost gjørt sítt til, at vit hava megnað so væl at varðveitt arbeiðsfólk. Lága arbeiðsloysið ger kortini, at tað er torførari at finna arbeiðsfólk, sum ikki er yrkislært, og ber ofta við sær, at neyðugt er at seta skúlanæmingar í starv ávísar tíðir av árinum. Vit hava stóra útskifting av starvsfólki í okkara framleiðsluvirki, har ung fólk ofta arbeiða í stutta tíð, áðrenn tey fara undir lesnað.

Vit virða fakfelagsfrælsið og rættin til sattmálasamráðingar hjá fakfeløgum og taka ikki lut í nøkrum flutningsskipaðum ella tvingsilsarbeiði og misnýta ikki børn sum arbeiðsmegi. Vit eru limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, sum ger sáttmálasamráðingar fyri privata arbeiðsmarknaðin, sum hevur eitt vælskipað fakfelag. Í 2018 vóru 90% av starvsfólkinum umfatað av kollektivum sáttmálasamráðingum (hini 10% eru myndað av serkønum starvsfólki).

Vit møtast javnan við yrkisfeløg og stremba eftir at hava eitt gott og uppbyggjandi samband við tey. Starvsfólkaumboð fáa frí frá sínum arbeiði til tess at útinna sínar skyldur. Bakkafrost hevur haraftrat eina mannagongd til viðgerð av kærum. Fyri at tryggja, at vit lúka krøvini innan heilsu, trygd og trivnað, skipa vit fyri árligari venjing, har innanhýsis og uttanhýsis venjarar læra frá sær innan øki, alt frá reinføri, fyrstuhjálp, trygd á arbeiðsplássinum (umframt trygd á sjónum), tryggari nýtslu av evnafrøði, og til fiskatrivnað. Vit eftirmeta javnan okkara skeið. Haraftrat veita vit eisini okkara leiðslubólki møguleikar fyri at menna seg víðari.




Fleiri upplýsingar um samanseting av arbeiðsmegi (íroknað fjølbroytni), útskifting og upplæring sæst á www.bakkafrost.com/sustainability

**Í 2018:**

- Skrivaðu vit undir tær 10 meginreglurnar hjá UN Global Compact og góvu harvið lyfti um at verja menniskjarættindi; at virða fakfelagsfrælsi og rættin til kollektivar sáttmálasamráðingar; og at hava eina arbeiðsmegi, sum ikki er merkt av tvingsli, barnaarbeiði ella mismuni.
- Veittu vit arbeiði til 1.032 starvsfólk (ið svarar til 783 fulltíðarstørv) úr 24 av teimum 29 kommununum í Føroyum.
- Settu vit 80 fólk í starv av nýggjum (eftir ein nýggjan sølusáttmála), eftir at 150 fólk mistu arbeiðið við ársbyrjan. Vit hildu áfram at seta nýtt fólk í starv inn í 2019.
- Settu vit eisini nýtt fólk í starv á okkara nýggju smoltstøð, biogassvirki og nýggja kryvjivirki.
- Sjósettu vit eitt nýtt átak fyri at integrera nýggj starvsfólk, har vit regluliga bjóðaðu útlendskum arbeiðsfólki undirvísing í føroyskum.
- Bjóðaðu vit okkara alarum nýggj skeið (sum eisini umfataðu burðardygd) og góvu 22 limum av nevndini og leiðslubólkinum eitt serligt leiðara útbúgvingarskeið hildið av the Cambridge Institute for Sustainability Leadership. Burðardygd var eisini umrøðuevnið á okkara virkisdegi.
- Vóru vertir fyri einum tiltaki fyri netverkinum hjá føroyskum kvinnum innan vinnuna.

Tað eydnaðist okkum ikki at avgreiða eina kanning viðvíkjandi, hvussu hugað starvsfólk eru, sum nú eftir ætlan skal gerast liðug í 2019, har ætlanin eisini er at endurnýggja okkara starvsfólkastrategi, so hon eisini er í tráð við okkara Sunt Lív ætlan. Vit fara eisini at dagføra leiðreglurnar fyri okkara virkisábyrgd, sum eisini fatar um okkara framhaldandi lyfti um javnstøðu. Okkara ætlanir umfata eisini at menna leiðaravenjingina víðari, umframt leiðbeining um fjølbroytni og stig til at stuðla eina fjølbroytta arbeiðsmegi.

> „Eg havi verið við á ókeypis málskeiðunum, sum Bakkafrost hevur boðið út, síðani apríl 2018. Tað er umráðandi fyri meg at læra føroyskt, eftirsum meginparturin av míni familju tosar føroyskt. Eg vil sera fegin tosa málið, so eg kann luttaka í samrøðum. Tann parturin av undirvísingini, ið mær dámar best, er at læra úttalu og umseting.“
>
> **Vivian Lamhauge,** Góðskingarvirkið, næmingur í føroyskum

## HEILSA, TRYGD OG TRIVNAÐUR

Um vit vilja verja okkara menniskjaliga fæfeingi, mugu vit varðveita eitt høgt stig innan arbeiðstrygd og skapa eina heilsugóða arbeiðsmentan. Okkara leiðreglur fyri atferð lýsa okkara tilsøgn til starsvfólkini um at skapa eitt gott og heilsugott arbeiðsumhvørvi og at hava eitt arbeiðspláss uttan óhapp og skaðar. Til tess at megna hetta hava vit fingið reglugerðir, sum eru bygdar á hægstu heilsu- og trygdarkrøv, á landi sum á sjógvi.

Øll okkara virðisketa – framleiðsla av fóðri, smoltstøðir, aliøkir og okkara kryvji- og framleiðsluvirki – eru grannskoðað av triðjaparti og góðkend eftir GLOBAL G.A.P. standardinum, sum setir strong krøv um trygd og heilsu hjá starvsfólki, íroknað regluliga starvsfólkavenjing og menning av trygd. Okkara sjey ASC góðkendu aliøkir hava verið grannskoðað aftur til tess at tryggja, at altjóða trygdar- og heilsukrøv verða vird í arbeiðsumhvørvinum. Viðmæli frá kanningarfólki á ávísum aliøkjum verða vanliga sett í verk á øllum hinum aliøkjunum. Í 2018 t.d. innførdu vit nýggjar brunatrygdarreglur, sum eru strangari enn landsins lógir krevja.

**BAKKAFROST MIST TÍÐ SKAÐASTIG**

MTS PR MIÓ ARBEIÐSTÍMAR

| 2016 | 2017 | 2018 |
|---|---|---|
| 26.00 | 31.00 | 14.00 |

Sí síður okkara um burðardygd á netinum til meira kunning um heilsu og trygd og grundarlag okkara fyri frásøgn

Dømir, sum kunnu nevnast, um hvussu vit arbeiða fyri starvsfólkaheilsu og trygd, umfata eina røð av verjandi átøkum (so sum verndarklæði) og fyribyrgjandi átøk (so sum okkara arbeiðsbólkar innan trygd á staðnum, sum samskifta við okkara heilsu- og trygdarnevnd.

Allir alarar og alt fólkið á sjónum skal hava heilsukanning annaðhvørt ár (goldið av fyritøkuni) fyri at tryggja, at tey hava nóg góða heilsu til sítt arbeiði.

Okkara innanhýsis politikkur stuðlar undir trivnaðin hjá arbeiðsfólki okkara, og hetta verður eisini havt í huga í nýggjum byggiverkætlanum, eitt nú í okkara framkomna framleiðsluvirki og høvuðssæti, sum eru ergonomiskt sniðgjørd.

Trivnaðurin hjá øllum okkara starvsfólki í virðisketuni er eisini umráðandi fyri okkum. Vit virða øll altjóða menniskjarættindi og tryggja okkum, at vit ikki eru samsek í misnýtslu av mannarættindum. Vit vænta tað sama av okkara samstarvsfelagum; teir verða við sáttmála bidnir um m.a. at lúka okkara veitarastandardir, sum m.a. krevja, at teir tryggja, at alt arbeiði verður gjørt í einum tryggum arbeiðsumhvørvi, sum ikki er merkt av mismuni og misnýtslu av børnum.

**Í 2018:**

- Náddu vit okkara tilsøgn um at betra okkara frásøgn um heilsu, trygd og trivnað.
- Styrktu heilsu- og trygdarmentanina við at halda áfram at innarbeiða tær í okkara virkis- og mannagongdir.
- Høvdu vit eingi deyðsføll og skerdu mista lutfallið av tíð, sum stóðst av persónsskaðum, niður í helvt.
- Betraðu vit mannagongdir viðvíkjandi eldi og trygdarútgerð enn meira.
- Hildu vit áfram at menna okkara landstøðir, har likamligur trivnaður var í miðdeplinum.
- Hildu vit áfram við heilsu- og trygdarvenjing, umframt eina venjing fyri alt samtakið um vandarnar av eldsbruna.
- Hildu vit áfram við at geva starvsfólki møguleikan at geva afturmeldingar gjøgnum arbeiðsbólkar á staðnum. Sí www.bakkafrost.com/sustainability, har meira nágreiniligt tilfar um heilsu, trygd og trivnað eru at finna.

Umvegis okkara komandi starvsfólkakanning um áhuga í 2019 er ætlanin at fáa viðmerkingar, sum kunnu hjálpa okkum at skerja enn meira um heilsu- og trygdarváðar og eyðmerkja økir, har vit kunnu gera meira fyri trivnaðin hjá starvsfólki. Vit fara eisini at tryggja okkum, at heilsan, trygdin og trivnaðurin hjá arbeiðsfólki framhaldandi fer at vera í miðdeplinum í okkara frásøgn um starvsfólkastrategi í 2020.

# Sunn fólk
# **Íløgur í okkara fólk**



Rúni Weihe

Vit raðfesta íløgur í menniskjaliga fæfeingið sera høgt, og hetta er orsøkin til, at vit vóru sera errin av at hava tveir av Føroya 13 PhD lesandi í starvi hjá okkum í 2018.

Við stuðli frá Bakkafrost byrjaði Rúni Weihe, leiðari á fóðurdeildini, sína doktararitgerð í 2011. Mál hansara var at fastseta munadyggastu føðslu samansetingina fyri bestu laksagóðskuna og vakstrarferðina, sum hann kannaði við at granska ymiskar fóðursamansetingar.

Hansara PhD verkætlan frá Norwegian University of Life Sciences gjørdi nágreiniligar kanningar av bestu javnvágini millum feitt og protein innihald í laksafóðri. Hansara gransking kom til ta niðurstøðu, at laksur, sum við eini føði, sum hevði hægri lutfall av proteini enn feitti, gagnnýtti fóðri betur og vaks skjótari.

Granskingin kom til ta niðurstøðu, at hóast kostnaðurin av hesum fóðrinum var hægri yvir styttri tíð, gjørdu vakstarfyrimunirnir, at hetta lønti seg við tíðini.

Úrslitini, sum Rúni kom fram til, fara at seta sín dám á framferðarhátt okkara við fóðri framyvir: „Eg eri takksamur fyri fokusið, sum Havsbrún framhaldandi hevur á menning av fóðri. Grundað á okkara gransking hava vit vitanina til at betra okkara fóðurstrategi og fiskaavrik fyri at økja enn meira um virðið á laksinum hjá Bakkafrost í longdini.“

Bakkafrost leggur stóra orku í at stuðla framhaldandi menningini av síni arbeiðsmegi. Í 2018 hevði Cambridge Institute for Sustainability Leadership eitt serligt leiðsluskeið fyri 22 limum frá nevndini og øðrum leiðarum. Les meira um okkara framferðarhátt til læru og menning í 2018 á síðu 15.

# Sunnur laksur
# Frásøgn um avrik

### STRATEGISK RAÐFESTING

- At nøkta og vera betri enn leiðandi standardir

### 2020 TILSAGNIR

- Varðveita høga Omega-3 støðið
- Varðveita høgt kundanøgdsemi við vørugóðsku
- Minka fellið av fiski til 6%
- Hava ASC góðkenning á øllum aliøkjum
- Menna og íverkseta ikki-medisinska viðgerð við stórum denti á fiskavælferð enn meira
- At eingin fiskur skal sleppa

### 2018 AVRIK Í MUN TIL TILSAGNIR

- 2,4 gramm pr 100 gramm merkir Omega-3 støði (grønt)
- 97,3% av kundunum nøgdir, meira enn nøgdir ella sera nøgdir við vørugóðskuna (grønt)
- Fellið av fiski 11,56% (reytt)
- 7 aliøkir ASC góðkend (grønt)
- Fleiri rognkelsir og royndir við mekaniskari avlúsing við størri fokus á heilsu og trivnað (grønt)
- Eingin fiskur slapp (grønt)

### 2019 FOKUS

- Minka um fellið við áhaldandi eftirliti
- Økja talið av rognkelsum á aliøkjunum
- Fáa 7 aliøkir ASC góðkend afturat
- Halda fram við at økja um høga útbúgving til alingina

### SDG MÁL

- SDG 2 Eingin hungur
- SDG6 Reint vatn og reinføri
- SDG 14 Lívið undir vatni
- SDG 17 Samløg um málini

**HVÍ TAÐ HEVUR TÝDNING**
Óhoyrdur fólkavøkstur og ein økjandi eftirspurningur eftir proteini setir eitt trýst á klótuna, sum vit ikki hava sæð áður. Havbúnaðarvinnan er ein háttur at møta hesum eftirspurningi, av tí at hon kann veita eina burðardygga og sunna keldu av proteini – alilaksur telist millum sunnastu proteinini á klótuni, orsakað av høga innihaldinum av Omega-3, feittsýrum, selen og B vitaminum. Framleiðslan má kortini vera ábyrgdarfull, um hon skal vera burðardygg.

Hóast føroysku firðinir geva bestu umstøðurnar at ala laks, hava árini víst okkum, at vandin fyri lús og sjúku samantvinnað við, at vinnan var syndrað, stundum hava hótt heilsuna hjá okkara laksi. Sameiningin av føroysku alivinnuni – frá 63 alifyritøkum í 1989 til tríggjar í 2017 – hevur gjørt tað lættari at samskipa eina betring av lívfrøðiligu viðurskiftunum, tryggja munagott samstarv við myndugleikarnar og deila vitan.

Veterinerskipanin innførdi í 2003 nýggjar reglugerðir, herdi eftirlitið og virkaði fyri eini sjálvbodnari sundurskiljing av aliøkjum og alivirksemi, og hetta betraði um fiskaheilsuna og trivnað um allar Føroyar. Nýggja skipanin, samantvinnað við øðrum átøkum hjá fyritøkuni, minkaði ikki bara um fellislutfallið úr 18% niður á 6%, hon økti eisini um tøkuvektin av føroyskum laksi við 20% millum 1993 og 2010, minkaði um fóðurnýtsluna við 2% og betraði um framleiðsluna við yvir 40% yvir sama tíðarskeið (kelda: www.industry.fo).

Men at berjast við fiskalús og sjúkur, so sum sjúkuelvandi ILA og táknusjúku, verður verandi ein raðfesting hjá laksaalarum ikki bara í Føroyum. At taka sær av hesum váðunum fyri at tryggja góðskuna og trygdina hjá okkara laksi, meðan vit varðveita hægsta heilsu- og trivnaðarstøðið, hevur eisini gjørt tað neyðugt at hava eitt sjálvboðið samstarv millum fyritøkur og gera stórar íløgur í nýggja tøkni fyri at hava eina framhaldandi menning.

Nýggjar avbjóðingar sum standast av skiftandi aliumstøðum fara eisini at koma í fokus komandi árini.

Við at seta ein ábyrgdarfullan framferðarhátt í brennidepilin gera vit okkara til, í meira ella minni mun, at røkka málum 2, 6, 14 og 17 hjá ST fyri burðardyggari menning. Sí síðu 9 fyri meira kunning.

**VØRUGÓÐSKA**
Vørugóðska er okkara hægsta raðfesting. Okkara laksur veitir eina heilsugóða, gagnliga og burðardygga keldu av djóraproteini, sum inniheldur nógv Omega-3. Hvørt lið í okkara framleiðslu er savnað um at varðveita góðsku í heimsflokki við høgum føðsluvirði. Við 40 árum á baki sum alifyritøka vita vit, at vørugóðskan veldst ikki bara um fullkomnar umhvørvisumstøður, hægstu heilsu- og trivnaðarstandardirnar, men eisini um fyrstafloks fóður.

Vit eru sannførd um, at tað at halda føðina so nær natúrligu føðini hjá villa laksinum gevur ágóðar, ið kunnu mátast, íroknað eitt sunnari føðsluvirði á okkara liðugvøru. Vertikala integratiónin av okkara fiskamjøli, lýsi, alifóðri og laksaframleiðslu gevur okkum fyrimunin at kunna útvega hægstu góðskuna av marinari rávøru frá okkara væl skipaða staðbundna fiskiskapi til okkara fóður. Hetta gevur okkum møguleikan at nýta eitt høgt prosenttal av burðardyggum innihaldi úr havinum, sum gevur

# Bakkafrost laksur

**2018 OMEGA 3 STIG**
MIÐAL
**2.4**g
pr 100g
Dagligur skamtur
0.25g*

**2018 OMEGA 3 TIL 6**
LUTFALL
**1.5**

**2018**
**DIOXIN STIG**
**0.4**pg/g
2017: 0.4pg/g
2016: 0.4pg/g
ES maks stig aftan á 2012

**2018**
**DIOXIN-LÍKT PCB INNIHALD**
**0.6**pg/g
2017: 0.6pg/g
2016: 0.7pg/g
ES dioxin-lík PCB-ir maks Stig aftan á 2012
6.5 pg/g dioxin

**2018 PROTEIN STIG**
**20.7**g
pr 100g
Dagligur skamtur
58g*



**2018**
**MERCURY LEVELS**
**0.05**mg/kg
2017: 0.04mg/g
2016: 0.03mg/g

**2018 VITAMIN B12 STIG**
MIÐAL
**3.17**µg
pr 100g
Dagligur skamtur
2 µg*

**2018 VITAMIN E STIG**
MIÐAL
**2.77**mg
pr 100g
Dagligur skamtur
9mg*

**2018 VITAMIN D STIG**
MIÐAL
**6.28**µg
pr 100g
Dagligur skamtur
10 µg*

**2018 SELEN STIG**
**0.19**g
pr 100g
Dagligur skamtur
0.06mg*

**2018 JOD STIG**
**0.09**g
pr 100g
Dagligur skamtur
0.15mg*

Føðsluvirði útroknað pr. 100g (einstøku laksaportiónir hjá Bakkafrost eru millum 80-225g) Kelda: Nordic Nutrition Recommendations 2012 og EFSA

okkara laksi eitt sera høgt innihald av Omega-3 – í miðal 2,4 gramm pr 100 gramm av laksaflaki. Í 2015 gjørdust vit fyrsta fyritøkan, sum fór undir at reinsa alt lýsið, sum vit framleiða til okkara fóður fyri umhvørvisdálkandi evni so sum dioxin og DL-PCB, hóast vit frammanundan reiðiliga hildu okkum innan fyri mørkini hjá ES. Okkara fóður inniheldur heldur ongan heilivág, vakstrarhormonir ella innvølir ella avskurð frá nakrari aling. Vit halda okkum eisini væl undir markið hjá ES viðvíkjandi óynsktum evnum í djórafóðri.

Okkara dioxin og dioxin líknandi PCB eru eisini undir markinum hjá ES (sum sæst á myndini), men vit halda áfram at leita eftir nýggjum hættum at minka enn meira um hesi evni í okkara laksi.

Við at halda okkum til fleiri standardir og góðkenningarskipanir tryggja vit okkum, at vit eru í oddanum á marknaðinum innan matartrygd. Vit hava eina umfatandi innnanhýsis eftirlitsskipan, sum javnan verður kannað av myndugleikunum. Hetta merkir, at vit dagliga gera kanningar og eftirlit av okkara vøru, áðrenn hon verður góðkend við heilsuváttan, fyri at tryggja, at hon lýkur krøvini hjá føroyskum og altjóða reglugerðum innan heilsu- og matvørutrygd. 100% av okkara vørum og øll virðisketan eru fevnd av triðjaparts góðkenning, sum fevnir um høg altjóða trygdarkrøv til matvøruframleiðslu. Les meira um hetta undir samstarv og góðkenning á síðu 22.

**Í 2018:**

- Góvust vit at nýta ethoxyquin í øllum fiskamjøli, sum verður nýtt í okkara alifóðri til laksin (og nýttu í staðin natúrligar antioxidantar).
- Varðveittu vit okkara høga innihald av Omega-3.
- Varðveittu vit høga kundanøgdsemið fyri vørugóðsku.
- Kannaðu vit alternativt innihald til fóðrið fyri at økja um føðsluvirðið og gjørdu kanningar fyri at fáa sum best burtur úr føðsluumstøðum hjá hágóðsku, heilsugóðum laksi (við fokusi á gagnnýtslu av fóðri, vøkstri og góðsku).
- Steðgaðu vit næstan fullkomiliga við at nýta formalin á okkara smoltstøðum, og fóru í staðin undir at nýta natúr-ligt saltvatn.
- Broyttu vit okkara doyviháttt frá at nýta doyving við el til at nýta mekaniska doyving, sum betraði um góðskuna og avmarkaði strongd.
- Byrjaðu vit eina granskingarverkætlan fyri at hjálpa okkum at fáa bestu umstøður eftir tøku fyri at betra um góðskuna av laksi.
- Fingu vit eitt 2. pláss á German Stiftung Warentest 2018 kanningini fyri lægsta innihaldið av eiturevni í bólkinum fyri frystar vørur (íroknað organiskar), og eitt annað pláss fyri góðsku sum heild í ikki-lívrunnum frystum vørum.

## KUNDASTIG AV GÓÐSKUNI Á LAKSINUM HJÁ BAKKAFROST

Avspeglar myndina hjá kundunum umboðandi 61% av umsetninginum í 2016, 42% í 2017 og 32% í 2018




**2018**
- ■ 0% Ónøgd
- ■ 3% Eitt sindur nøgd
- ■ 38% Nøgd
- ■ 59% Meira enn ella sera nøgd

| 2016 | | 2017 | |
|---|---|---|---|
| 0% | Ónøgd | 0% | Ónøgd |
| 8% | Eitt sindur nøgd | 4% | Eitt sindur nøgd |
| 30% | Nøgd | 19% | Nøgd |
| 62% | Meira enn ella sera nøgd | 77% | Meira enn ella sera nøgd |

Í 2019 fara vit framhaldandi at binda okkum til at varðveita høga Omega-3 innihaldið og okkara høga kundanøgdsemi fyri vørugóðsku. Vit fara somuleiðis at íverkseta úrslitini frá gransking okkara í fóðurstrategi og halda áfram at kanna nýggjar møguleikar at menna okkum enn meira og betra um góðskuna av okkara fóðri.

### FISKAHEILSA OG TRIVNAÐUR

Bakkafrost fer framhaldandi at binda seg til at halda leiðandi føroyska veterinera leistin, sum umfatar sjúkuviðgerð og fyribyrging, eftirlit við fiskalús og flutningi. Hetta umfatar eisini føroysku djóraverndarlógina, har tey fimm frælsini eisini inniganga. Okkara íløgur á hesum øki tryggja bæði, at góðskan á endaligu framleiðsluni er høg, og at laksatrivnaðurin er góður, sum er av enn størri týdningi.

Okkara royndi fiskaheilsubólkur, sum er mannaður av djóralæknum, lívfrøðingum, umframt hjálparfólki, leitar altíð eftir nýggjum hættum at varðveita góðan djóratrivnað og minka um nýtsluna av evnavøru og heilivági í sambandi við fyribyrging av sjúkum og fiskalús.

Vit ala okkara laks uttan at nýta antibiotika (sum vit ikki hava nýtt síðan 2004).

## ATLANTSLAKSUR FELLISLUTFALL
2018

**11.56%**

2017: 8.96%

Søgulig tøl, sí globalsalmoninitiative.org

## TAL AV FISKALÝS
2018

**0.47**

2017: 0.7
2016: 0.8

Miðal í 12 mánaðir av vaksnum kvennlúsum á øllum aliøkjum. Nærri kunning um hvíldarskeið og heilivágsnýtslu, sí síður okkara um burðardygd á netinum.

Vit halda áfram at nýta rognkelsi í øllum nýggjum árgangum og aliringum til tess at fyribyrgja lús (nú á 13 ymiskum aliøkjum), og sum partur av okkara íløguætlan hava vit gjørt stórar íløgur í aðrar ikki medisinskar viðgerðir so sum feskt-vatn, flógvur sjógvur og við spuling. Aðruhvørja viku verður nøgdin av lús kannað, og upplýsingarnar verða sendar myndugleikunum (upplýsingarnar eru almennar).

Okkara ætlan innan lívfrøðitrygd hevur eisini ført til stórar íløgur í at gera betringar og byggja nýggjar smoltstøðir á landi (so sum okkara nýggja støð á Strond), sum ger tað gjørligt at økja um miðalstøddina av smolti til 500 gramm, áðrenn tey verða sett á sjógv. At minka um tíðina á sjónum fer at økja um framleiðsluorkuna og minka um lívfrøðiligan váða.

Vit velja fisk frá útvaldum lívfiskaskráum fyri at betra um mótstøðuførið hjá fiskinum (les meira á síðu 23), vit koppseta allan okkara fisk og taka lut í skipaðari grannskoðan av lívfrøðitrygd av øllum okkara fiskatilfeingi. Okkara fiskaheilsubólkur og djóralæknar gera regluligar kanningar av øllum okkara aliøkjum og smoltstøðum, og myndugleikarnir gera somuleiðis regluliga kanningar av royndum.

Við at halda okkum til føroysku veterinerskipanina frá 2003 binda vit okkum til ávís trivnaðarátøk fyri laksin, eitt nú at halda okkum undir markinum fyri tættleika (sum kann síggjast á teirra heimasíðu), sum vit minka á okkara nýggju

## ORSØKIR TIL, AT MINNI KOM UNDAN
2018

- Alguvøkstur við Kolbanagjógv
- Smolt sjósett køld tíðarskeið
- Mekanisk avlúsing
- Økt útbreiðsla av PMCV smittaðum fiski
- Niðursett táknuheilsa og tøk ilt

„Í 2018 øktu vit ferðina á tilgongdini at skapa bestu heilsuna hjá laksinum og betra um aliumhvørvið. Kortini høvdu nýggju avlúsingarhættirnir, saman við umhvørvisligum viðurskiftum, eitt stórt árin á fellið. Hetta minnir okkum á, at vit mugu halda fram at kanna øll viðurskifti, sum hava ávirkan á okkara mannagongdir, so vit kunnu halda fram at ala Bakkafrost laks undir so góðum umstøðum sum gjørligt."

**Anna Johansen,** góðskuleiðari fyri samtakið.

alistøðum við at nýta størri nótir. Vit hava nágreiniligar veterinerar heilsuætlanir fyri hvørt einstakt aliøki, sum áhaldandi fær venjing í lívfrøðitrygd.

Okkara sera stutta fjarstøða (í miðal 22 fjórðingar) millum tøku og framleiðslustað minkar um strongdina undir flutningi. Vit leita kortini alla tíðina eftir nýggjum hættum at betra um fiskatrivnaðin. Umframt at økja um data til at betra um fiskatrivnaðin undir mekaniskari avlúsing, gera vit eisini kanningar fyri at minka um fellið á sjónum í teimum kaldaru mánaðunum (við at kanna tekin um strongd). Vit hava eisini innført nýggjar skanningar, sum skulu hjálpa okkum at fáa eyga á og minka um møgulig sjúkuelvandi virus í okkara biomassa.

Vit eru hildin fram við at gera íløgur í serkøn starvsfólk á okkara smoltstøðum fyri at betra um trivnaðin hjá smoltinum, sum verður sett á sjógv.

**Í 2018:**

- Yvirtóku vit føroysku lívfiskaætlanina (les meira á síðu 23) og gjørdu kanningar fyri at betra um lívfrøðitrygdina og fyri at skilja PMCV íleguna betur.
- Fóru vit undir virksemi á nýggju smoltstøðini á Strond, sum eftir ætlan skal hava størstu rúmdina til smolt í heiminum. Støðin varð bygd við tí endamáli, at fiskaheilsa og fiskatrivnaður skuldu vera í miðdeplinum, umframt at minka um umhvørvisligu árinini (les meira á síðu 30).
- Endaðu vit kanningarnar um at skerja viðurskifti, sum føra til strongd á smoltstøðunum og øktu harvið um vakstrarferðina hjá smoltinum.
- Settu vit tríggjar nýggjar lívfrøðingar í starv á smoltstøðunum.
- Fingu vit ein tilburð av nýrasjúkuni BKD á einum av okkara aliøkjum. Við at bera skjótt at og halda hvíldarskeiðið longri fingu vit tamarhald á sjúkuni. Hetta var einasti nevniverdi sjúkutilburður í 2018.
- Skrásettu vit eitt felli á umleið 630.000 fiskar (sum høvdu eina miðalvekt á 500 gramm) á aliøki A-81 í Kolbanagjógv. Eitt eitrandi slag av algu varð funnið á staðnum. Hetta hevur ávirkað okkara felli og kostaði okkum 7,2 mió. kr.
- Løgdu vit doyin á best møguligt iltstøði og fingu til vega nýggja útgerð at máta við.
- Fluttu vit aliringarnar á opnari øki, so bæði streymur og iltstøðið øktust.
- Mentu vit okkara mannagongdir fyri avlúsing og royndarkoyrdu nýggjar mekaniskar avlúsingarmátar við størri atliti at fiskaheilsu og fiskatrivnað. Vit nýttu eingi evnafrøðilig evni í okkara laksaaling í 2018.
- Skerdu vit SLICE lúsaviðgerð við næstan 60% ár um ár.
- Minkaðu vit sera nógv um talið av búnari lús við fyribyrgjandi átøkum og nýggjum viðgerðum.

At skerja okkara felli gjøgnum økt eftirlit verður raðfest høgt í 2019. Hetta var frammanundan raðfest óvanliga høgt í 2018 orsakað av tilburðinum á aliøkinum við Kolbanagjógv. Ætlanin er eisini at halda fram við at nýta rognkelsi á øllum aliøkjum, har tað er gjørligt, umframt at byrja at nýta 200-metra aliringar við lægri tættleika. Haraftrat fara vit at seta nýggjan djóralækna í starv á smoltstøðini á Strond.

## LÍVFRØÐILIG TRYGD

Tað er serstakliga umráðandi fyri okkum at vera fyrivarin og sleppa undan, at sjúkur bróta út og spjaða seg, umframt at forða fyri at lús spjaðir seg millum alilaks og fiskin í firðunum, so bæði okkara laksur og fiskurin í natúruni eru sunnir (hetta hóast sjúkur frá laksi ikki eru ein stór hóttan). At sleppa undan, at laksur sleppur, er ein støðug avbjóðing hjá okkum. Føroyar eru undirlagdar ógvisligum ódnarveðri í Atlantshavinum, sum av og á er atvoldin til skaða á aliringarnar, har tað ikki slepst undan at laksur sleppur. Vit boða alt fyri eitt avvarðandi myndugleikunum frá, tá ið vit fáa illgruna um, at hetta er farið fram.

Aftrat tí at betra um útgerð, innføra átøk at skerja vandan fyri at fáa smittusjúkur í alingini, minka vit eisini um tíðina, laksurin er á sjónum, og eru regluliga undir eftirliti av triðjaparti til tess at tryggja, at okkara virksemi er í samsvari við føroyska lóggávu.

**Í 2018:**

- Eftirmettu vit mannagongdirnar at kanna aliringar fyri at minka enn meira um vandan fyri, at laksur sleppur. Sum eitt nýtt átak, fingu vit eina nýggja skipan við upptøkutólum setta upp (sum varð knýtt saman við nýggjari, mekaniskari reingerð av aliringunum).
- Slapp eingin fiskur. Hetta fer alsamt at vera eitt mál hjá okkum. Fyri søguligt tilfar á hesum øki, sí GSI heimasíðuna.

## SAMSTARV OG GÓÐKENNING

Vit viðurkenna, at samstarv við laksavinnuna er av størsta týdningi, um vit skulu møta teimum skipaðu avbjóðingunum, sum vit hava viðvíkjandi burðardygd. Vit spældu ein týdningarmiklan lut í stovnanini av Havbúnaðarfelagnum og mæltu til at seta í verk felags átøk til at fáa tamarhald á fiskalús og sjúku. Í 2013 gjørdust vit stovnandi limur av the Global Salmon Initiative (GSI), sum er eitt altjóða leiðsluátak, ið virkar fyri at betra um burðardygdina í laksaaling. Sum liður í hesum samstarvi hava vit bundið okkum til at fáa øll okkara aliøkir góðkend av the Aquaculture Stewardship Council (ASC).

Góðkend aliøki eru: A-25 Gøtuvík • A-06 Gulin • A-71 Funningsfjørður • A-57 Fuglafjørður • A-12 Kunoyarnes • A-04 Lambavík • A-13 Borðoyarvík • Tvinni aliøkir aftrat fingu góðkenning í januar 2019: A-21 Hvannasund Suður og A-73 Hvannasund Norður.




Aftrat hesum hava vit teknað okkum til eina røð av øðrum uttanhýsis standardum og góðkenningarskráum fyri at tryggja okkum, at vøra okkara er burðardygg, hevur høga góðsku og er trygg (sí niðanfyri).

**Í 2018:**

- Settu vit ferð á ASC góðkenning á okkara aliøkjum og fingu trý aliøkir aftrat góðkend. Sostatt vóru tilsamans sjey aliøkir góðkend, sum er ein meira, enn vit ætlaðu frammanundan.
- Stóðu vit royndina 100% av grannskoðan av ymisku góðkenningarskráunum.

Í 2019 er mál okkara at fáa sjey aliøki aftrat góðkend undir treytunum hjá ASC (so vit samanlagt kunnu fáa 14 aliøkir góðkend) og ætlanin er, at øll okkara aliøkir skulu vera góðkend innan árslok 2020.

Framleiðslur okkara av fiskamjøli, lýsi og fóðri á Havsbrún hava eisini fleiri góðkenningar. Allar eindirnar eru góðkendar eftir ISO9001:2015 standardinum, og mjøl- og lýsideildin er góðkend eftir GMP+ standardunum, IFFO RS góðkenning og MSC Chain of Custody standardinum.

Framleiðslur okkara á kryvjivirkinum og góðskingarvirkinum hava ASC Chain of Custody góðkenning, og framleiðslan av virðisøktum vørum er góðkend eftir BRC og IFS matvørutrygdar standardunum.

Øll virðisketan – fóðurframleiðsla, lívfiskur, smoltstøðir, aliøkir, kryvjivirkið og góðskingarvirkið – eru góðkend eftir altjóða GLOBAL G.A.P. standardinum, sum miðsavnar seg um matvørutrygd í allari framleiðsluni, fiskavælferð, heilsu og trygd og handfaring av umhvørvinum.





# Sunnur laksur
# **Føroyskur, frá byrjan til enda**

„Fólk, sum starvaðust hjá Fiskaaling, vóru hjartans fegin, tá ið lívfiskaætlanin fór í gongd aftur. Tey vóru sera hugtikin av, at tey beinanvegin dugdu at síggja eyðkennini av føroyska laksinum, sum vísir øðrvísi atburð – so sum eina meira aktiva persónligheit. Íløgan hjá Bakkafrost fer at lyfta ætlanina upp á eitt hægri støði og kann slóða fyri betri lívfrøðiligari trygd í føroyskum laksi.“

**Jóhanna Lava Køtlum,** Fiskaaling

Í apríl 2018 tók Bakkafrost fulla ábyrgd av menningini av føroyska laksinum.

Yvirtøkan av ætlanini frá Fiskaaling (granskingardepilin hjá føroyskum havbúnaði) umboðar ein part av okkara strategi at økja lívfrøðitrygdina mest møguligt og varðveita høga góðsku í longstu samanhangandi virðisketuni í vinnuni.

Nýggja privata yvirtøkan av ætlanina fer ikki bert at gera tað møguligt at seta ferð á menningina av meira mótstøðuførum rognum – sum fer at minka um sjúkuváðan í alilaksi – men eisini at verja vitanarfeingið í Føroyum, sum er bygt upp gjøgnum árini við ætlanini. Rættiliga stóra íløgan á 200 milliónir krónur í nýtt undirstøðukervi á einum nýggjum øki á Sandoynni fer at geva neyðugu umstøðurnar til, at ætlanin kann mennast til fulnar við einum høgtlærdum starvsfólkahópi.

Rogn frá umleið 300 føroyskum laksafamiljum yvir fýra ættarlið fara at verða klakt í einum eftirlitsumhvørvi fyri at finna besta arvafrøðiliga margfeldi fyri til dømis at eyðmerkja arvaeginleikar fyri vøkstri og góðsku og at økja mótstøðuføri móti fiskalús og klekja burtur vanlig patogen, ið kunnu elva til sjúku. Byrjanarúrslitini á einum nýggjum ættarliði hava bent á stóra framgongd.

Fiskaaling tók klekiætlanina uppaftur í 2016 við stuðli frá Føroya Landsstýri.

Frá 2021 fara vit at nýta alt rognið frá føroysku klekiætlanini at framleiða Bakkafrost laks.

# Sunt umhvørvi
# Frágreiðing um avrik

## STRATEGISK RAÐFESTING

- At minka um árinið á umhvørvið

## 2020 TILSAGNIR

- Menna útfóðringina enn meira
- Halda áfram at skifta koparviðgjørdar nótir
- Seta eina burðardygga fóðurstrategi í verk

## 2018 AVRIK Í MUN TIL TILSAGNIR

- Settu myndatól upp á 5 aliøkjum afturat ●
- Skiftu allar koparviðgjørdu nótirnar, ið eftir vóru ●
- Fóru undir arbeiðið við nýggjari virkisætlan fyri burðardyggari fóðring ●

## 2019 FOKUS

- Taka enn fleiri av ST Global Compact meginreglunum við í okkara virðisketu
- Økja um innanhýsis tilfeingið fyri at gera framstig við framferðarhátti okkara til umhvørvisliga stýring
- Melda okkum til Ocean Disclosure Project
- Varðveita lágan fóðurfaktor
- Betra eftirlitið við burturkasti og vatni og fráboðan
- Seta almenn mál fyri minking av kolevni

## SDG MÁL

- SDG 6 Reint vant og reinføri
- SDG 7 Rímilig og rein orka
- SDG 9 Vinna, nýskapan og undirstøðukervi
- SDG 12 Ábyrgdarfull nýtsla og framleiðsla
- SDG 13 Veðurlagsátøk
- SDG 14 Lív undir vatni

### HVÍ TAÐ HEVUR TÝDNING

Hóast laksavinnan er ein av teimum virknastu í mun til at gera fóður til føði, hevur lágt útlát av $CO_2$ og lítla nýtslu av feskvatni í mun til aðrar vinnur, so er tað av sera stórum týdningi at lækka um árin okkara á umhvørvið.

Tey 19 aliøkini, ið eru í nýtslu hjá Bakkafrost í 2018, eru á 17 føroyskum firðum og hava ágóðan av framúrskarandi sjógóðsku og -útskifting orsakað av hørðum streymi og svalandi og støðugum hita. Hetta skapar framúr góðar umstøður at ala laks av høgari góðsku. Oyggjarnar hava nógv lívfrøðiligt fjølbroytni við serskakliga ríkum fugla- og sjólívi, og er fiskurin serliga týdningarmikil fyri búskapin. Í seinastuni er ferðavinnan kortini vorðin alsamt meira týdningarmikil. Tað er serstakliga umráðandi, at vit varðveita óspiltu firðirnar og hava sum minst árin á umhvørvið.

Vit virka í nógvum samfeløgum í øllum Føroyum, har vinnan og fólkið vanliga hevur trivist lið um lið. Henda óvanliga samanseting merkir, at vit ikki sleppa undan at ávirka umhvørvið, annaðhvørt við óljóði, lukti, vatnnýtslu, dálking av framleiðslu, ferðslu ella frárensli. Vit framleiða eisini okkara egna pakkitilfar umframt at nýta ymiskt annað framleiðslutilfar, og tí er tað eisini av týdningi at hava í huga, at vit eiga okkara lut í einum alheimstrupulleika við burturkasti.

Hóast okkara útlát av $CO_2$ er lutfalsliga lágt samanborið við aðrar vinnur, kunnu veðurlagsbroytingarnar hava stóra ávirkan á okkara vinnu í framtíðini. Skiftandi veðurlag (við meira illveðri), súrt havumhvørvi og hækkandi hitalag í sjónum kunnu øll vera vandamikil fyri alivinnuna.

Vit eru í eini serstøðu, av tí at vit hava eina fult integreraða veitingarketu við flestu av okkara aliøkjum innan fyri ein radius á 25 km. Okkara fóðurframleiðsla er nær aliøkjunum, og nógv av tilfarinum í okkara framleiðslu kemur úr nærumhvørvinum og frá burðardyggum keldum, sum skerjir okkara carbon útlát stórliga. Hóast hetta, nýta vit ymisk plantuískoyti, sum verða flutt yvir ymsar heimspartar. Tað er okkara meting, at tað serliga er í fóðri, at okkara størsta árin á umhvørvið er.

Við at tálma okkara árin á umhvørvið, gera vit okkara til, í størri ella minni mun, at røkka ST málum 6, 7, 9, 12, 13 og 14 fyri burðardyggari menning. Sí síðu 9 fyri meira kunning.

### DÁLKING Á STAÐNUM

Vit hava sett okkum fyri at minka um dálkingina av lokala umhvørvinum og náttúrulívinum á hvørjum liði í okkara virðisketu, umframt frárensl og leivdir av vøru í sjónum. Haraftrat eru vit sera tilvitað um at tálma óljóði og luftdálking.

At varðveita náttúrutilfeingið, sum veitir okkum umstøðurnar til okkara vøru, er serstakliga týdningarmikið fyri okkum sum fyritøka. Tí er neyðugt, at vit avmarka lokala dálking. Vit senda regluliga upplýsingar til myndugleikar og eru títt undir eftirliti av triðjapørtum, eitt nú veterineru myndugleikunum og Umhvørvisstovuni fyri at tryggja okkum, at vit halda okkum innan fyri øll mørk og framhaldandi minka um dálkingina. Sum dømi kann nevnast, at vit taka royndir av havbotninum (tá ið biomassin er størstur) og kanna innihaldið fyri kopar, zink og onnur tekin um dálking. Hesi mørk síggjast á heimasíðuni hjá

Umhvørvisstovuni. Í 2018 ljóðaði metingin, at undir 80% av okkara aliringum var havbotnurin í góðum standi (les meira um hetta á www.bakkafrost.com/sustainability/data). Tá ið royndir vísa, at vit ikki eru undir markinum, taka vit í stundini stig til broytingar sambært viðmælum frá myndugleikunum, eitt nú við at flyta aliringar. Vit stremba altíð eftir at betra um viðurskiftini, har vit síggja tekin til, at vit eru nær markinum, so vit ikki ovbyrja havbotnin.

Aftrat tí at vera í samsvari við strangar lokalar umhvørvis-reglugerðir, fara vit longri við sjálvboðin at vera í samsvari við altjóða ASC krøv. Vit arbeiða kortini framhaldandi við at avmarka okkara árin á firðirnar og fara at halda áfram at hava okkara áhugapartar við í hesum arbeiði.

**DØMI UM STIG TIL AT AVMARKA ÁRINIÐ Á FIRÐIRNAR**

- Fyri at verja havbotnin hava vit eitt 8-vikur langt hvíld-arskeið, so havbotnurin kann endurnýggja seg (hetta var í 2018 tað dupulta av tí, landsins myndugleikar krevja).
- Vit flyta aliringar, um royndir vísa, at havbotnurin er ov-byrjaður (hetta hendir sjáldan).
- Vit filtrera útstreymandi vatn frá framleiðsluni.
- Vit nýta onga evnafrøðiliga viðgerð fyri at sleppa av við lús (heldur ikki hydrogen peroxid), og nýta í staðin mekaniskar viðgerðir og rognkelsi í aliringunum.
- Vit nýta ikki kemiska evnið diflubenzuron til avlúsing.
- Vit hava minkað um nýtsluna av medisini í fóðrinum.
- Vit flyta aliringar til øki, har tað er meira ábært, og streym-urin er harðari.
- Vit góvust at nýta koparviðgjørdar nótir.
- Vit gjørdu íløgur í upptøkutól fyri at betra um spreiðingina av fóðri.
- Vit kannaðu sjógóðskuna eina ferð um mánaðin fyri fosfor og nitrogen.
- Hvønn ársfjórðing kannaðu vit fyri fóðurstøv fyri at betra um nýtsluna og skerja dálkingina.



Árnafjørður

Leggið vinarliga til merkis, at ein lítil nøgd av hydrogen peroxid varð nýtt í 2018 til tess at kanna, hvussu virkið tað er sum sótt-reinsingarevni til spillvatn.

Allir okkara aliringar liggja á føroysku firðunum, sum eru ríkir í sjó- og fuglalívi. Vit taka stig til at minka um okkara ávirkan á fugla- og sjólív, eitt nú við at skýla aliringarnar við høgum neti fyri at sleppa undan skaða á fugl, og herdu eftirlitið við aliringunum fyri at skerja talið av deyðum kópi. Sí heimasíðu okkara www.bakkafrost.com/sustainability fyri meira kunning um okkara ávirkan á lívfrøðiligt fjølbroytni.

**Í 2018:**

- Góvust vit at nýta koparviðgjørdar nótir (sum kann elva til upphópan av kopari í firðunum) og fóru í staðin undir at nýta nótir, sum verða viðgjørdar mekaniskt.
- Hildu vit fram at betra um spreiðingina av fóðri við at taka fimm vakmyndatól í nýtslu á fimm aliøkjum afturat til tess at minka um upphópan á havsbotninum, ið kann elva til uppbygging av zinki.
- Sum lið í okkara avlúsingarætlan nýttu vit ikki kemiska baðiviðgerð til laksin.
- Høvdu vit eingi dømi, har vit ikki hildu okkum innan fyri umhvørvislógir og reglugerðir. Vit halda fram at samstarva við myndugleikarnar til tess at tryggja, at vit hava so lítið árin sum gjørligt á lívið á botni í firðunum.
- Samstarvaðu vit við kringvarpið á staðnum fyri at kanna árinið av alivirksemi á umhvørvið á firðunum.

Í 2019 fara vit at halda fram við at innarbeiða meginreglurnar hjá ST Global Compact í okkara virðisketu. Vit fara at økja um tilfeingið í okkara góðskubólki fyri at skunda undir handfaring-ina av umhvørvisstýring. Vit fara at halda fram við at seta vak-myndatól á øll aliøkir og at kanna nýskapandi hættir at avlúsa laks uttan at nýta kemisk evnir.

## BURÐARDYGT ALIFÓÐUR

Fyri at varðveita so høga góðsku sum gjørligt hevur okkara laksafóður eitt hægri marint innihald enn nakar av okkara kappingarneytum. Hetta ger, at burðardygga og ábyrgdarfulla framleiðslan av lýsi og fóðri á dótturfelagnum, Havsbrún, er alsamt meira týdningarmikil. Hetta umfatar eisini, hvussu vit útvega alla rávøru.

Fiskamjølið og lýsið í okkara fóðri kemur frá burðardygt veiddum fiski við lágum føðsluvirði, og sum ikki hevur stóran eftirspurning sum beinleiðis mannaføði. Í 2018 stavaði meira enn fjórðingurin av fiskamjølinum og lýsinum í okkara fóðri frá fiskaavskurði. Hesin fiskur var í høvuðsheitum fiskaður í føroyskum sjógvi undir væl skipaðum og lógligum eftirliti.

Vit halda støðugt eyga við váðanum, sum stendst av at nýta eitt høgt lutfall av rávøru úr sjónum í okkara fóðri, og geva gætur, hvørjar avleiðingar tað hevur, at fiskur migrerar í Norðuratlantshavi. Fyri at minka um hesar váðar, nýta vit áhaldandi góðkenda framleiðslu framíhjá og leita eftir nýggjum proteini, sum somuleiðis byggir á eykaframleiðslu.

Okkara tætta samband við veitarar av sjógæti økir um møguleikarnar at menna vøruna og taka nýggjar vørur í nýtslu fyri at betra um góðskuna og burðardygdina av okkara fiskamjøli.

Plantuproteinið og oljurnar í okkara fóðri eru ikki-GMO og soyabønirnar eru Pro-Terra góðkendar (tær stava frá Minas Gerais og Mato Grosso í Brasilia), og hetta er okkara háttur at tryggja, at tær eru útvegaðar á burðardyggan hátt. Øll okkara rapsolja (sum hevur sín uppruna í ES og Eysturevropa) er góðkend burðardygg, og vit nýta ikki pálmaolju í okkara fóðri.

Sí heimasíðu okkara www.bakkafrost.com/sustainability fyri meira kunning um upprunan av sjógæti, sum fer í okkara fóður.

Gev gætur, at sera lítil variatión eru í innihaldinum av fóðri frá Bakkafrost, sum stóð fyri 90% av øllum fóðri, sum fyritøkan nýtti í 2018.

**Í 2018:**

- Øktu vit um nøgdina av marinari rávøru í fóðrinum, sum kom frá avskurði frá fiski, sum ikki var ætlaður sum beinleiðis menniskjaføði.
- Settu vit skjøtil á ætlanina um burðardyggan fóðurpolitikk.
- Hildu vit á at kanna aðrar burðardyggar rávørur úr sjónum av høgari góðsku.

Í 2019 fara vit av egnum ávum at tekna okkum til Ocean Disclosure Project fyri at økja um gjøgnumskygnið og seta sjóneykuna á meira útvegan av marinum tilfarið. Vit fara eisini at taka lut í eini Horizon 2020 verkætlan í samstarvi við EU Fishmeal fyri at halda á at kanna aðrar møguleikar (so sum mesopelagiskan fisk) at avmarka váðan í føðiketuni.

## BURTURKAST OG PAKKITILFAR

At minka um umhvørvisárinið av burtkasti er eitt umráðandi og vaksandi mál fyri allar fyritøkur. Í 2018 kom hetta mál í enn størri mun í brennidepilin um allan knøttin, serliga av plasti, ið bert verður nýtt ta einu ferðina.

Hóast laksur kastar størstu nøgdina av sær til matna av teimum fimm størstu bólkunum av djóraproteini, mugu vit framhaldandi hugsa um, hvussu vit minka um og endurnýta tilfar, frá tí løtu rognini koma á smoltstøðina, og til laksurin fer úr framleiðsluhølum okkara. Hetta umfatar bæði laksin sjálvan og alt tilfar, ið vit nýta til framleiðslu og pakking.

Hóast laksurin kastar nógva mannaføði av sær, stremba vit eisini eftir at gagnnýta alla eykaframleiðslu frá okkara laksi og selja harvið rygg, avskurð, skræðu og høvd.

## SAMANSETINGIN AV FÓÐRI HJÁ HAVSBRÚN Í 2018

| Hveiti | Hveitigluten | Ikki-Íleguviðgjørt SPC | Fiskamjøl | Lýsi | Rapsolja | Annað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 15,5% | 8,5% | 10% | 30,4% | 15,9% | 14,9% | 4,9% |
| (11.356 tons) | (6.186 tons) | (7.290 tons) | (22.195 tons) | (11.652 tons) | (10.859 tons) | (3.549 tons) |

Vit endurnýta ella gagnnýta gamlar alinótir og ketur, og vit umvæla kaðalar og rør frá gomlum ringum, tá ið vit gera nýggjar aliringar. Vit dagføra eisini okkara aliringar við at brúka sterkari tilfar fyri at økja um livitíðina. Vit samla fóðursekkirnar innaftur og endurnýta teir, tá ið tað er gjørligt.

**Í 2018:**

- Seldu vit 3.068 tons av eykaframleiðslu úr laksi (tað eydnaðist okkum ikki at selja 50 tons av skræðu til mótaídnaðin orsakað av lágum eftirspurningi.
- Komu vit á uppskotslistan hjá Edie.net 2019 Sustainability Leaders Awards fyri okkara hugburð til ringrás búskap.
- Fóru vit undir at framleiða laksalýsi og -mjøl á Havsbrún.
- Sí meira á www.bakkafrost.com/sustainability fyri okkara upplýsingar um pakkitilfar.

- Byrjaðu vit eina ætlan at eftirmeta okkara pakkitilfar, harumframt burðardygdina av okkara ráværu.
- Broyttu vit alla framleiðslu av pakkitilfari til 100% FSC góðkent pappír.
- Fráboðaðu vit íløguna í eitt nýtt biogassvirki, sum fer at taka ímóti lívrunnum burturkasti frá allari okkara aling og gera tað um til biogass og tøð.

Í 2019 er ætlanin, at vit við meira tilfeingi skulu gera framstig, hvat viðvíkur burturkasti umframt at hava eftirlit við vatni. Vit vilja hava okkara viðskiftafólk við í tilgongdini at bjóða meira burðardygt pakkitilfar. Vit fara at taka fyrsta stigið á hesum øki við at royndarkoyra nýtt pakkitilfar í samstarvi við ein av okkara størstu supermarknaðarkundum.

## ALILAKSUR | ÚRTØKA AV MATI

Úrtøka til matna verður roknað við at býta vektina á tí partinum, ið kann nýtast til matvøru við samanløgdu kropsvektini



| Alilaksur | Høsnarungi | Grísur | Neyt | Seyður |
|---|---|---|---|---|
| 68% | 46% | 52% | Eingi tøl | 38% |

Hesar útrokningarnar taka hædd fyri muni í fóðurfaktori, muni í úrtøku til matna og prísinum á avkomi
Kelda: Global Salmon Initiative



## VATN

Hóast vit njóta ágóðan av nógvum avfalli í Føroyum, merkir vantandi undirstøðukervið at útvega vatn, at vit mugu nýta feskvatn á virknan hátt, so lokala samfelagið fær nóg mikið av vatni, tá ið sjáldsamur turkur valdar á sumri. Okkara smoltstøðir hava størsta tørvin á vatni, og tí hava vit gjørt íløgur í betri tøkni, sum kann útvega vatn á okkara nýggju smoltstøðum. Vit vóru ein av teimum fyrstu alifyritøkunum í heiminum, ið fór undir at endurnýta vatn á okkara smoltstøðum, og endurnýta vit nú upp í 97,7% av vatninum fyri at minka um trýstið á vatntilfeingið.

**Í 2018:**

- Endurnýttu vit umleið 24.000 kubikkmetrar av vatni hvønn tíma á okkara smoltstøðum.
- Betraðu vit um effektivitetin á framleiðsluni á okkara fóðurvirki og minkaðu sostatt um tørvin á vatni.
- Spardu vit vatn í okkara framleiðsluhølum við at betra um reingerðina.
- Sí www.bakkafrost.com/sustainability fyri meira tilfar um vatnnýtslu.

Í 2019 fara vit at halda fram við at kanna nýskapandi hættir at stýra og avmarka vatnnýtsluna, serstakliga á okkara nýggju byggiverkætlanum. Sí síðu 30 fyri upplýsingar um, hvussu vit spara vatn á smoltstøðini á Strond.

## VEÐURLAGSBROYTINGAR OG ORKA

Sambært ST „Eru veðurlagsbroytingar tað týdningarmesta málið í okkara samtíð, og vit eru júst nú í einum avgerandi tíðarskeiði.“ Laksavinnan hevur eitt lutfalsliga lágt útlát av $CO_2$, um vit samanbera við aðrar vinnur (sambært Global Salmon Initiative standa alifeløg fyri undir 10% samanborið við framleiðslu av neytakjøti). Okkara sjónarmið er, at vit standa fyri einum enn lægri útláti, enn vit síggja á myndini við teimum fimm størstu bólkunum av djóraproteini. Hetta er orsakað av, at vit framleiða okkara egna fóður á staðnum, umframt at vit nýta nógv lokalt og burðardygt tilfar úr sjónum í okkara fóðurframleiðslu.

Alilaksur hevur ein av lægstu fóðurfaktorunum, 1,3 kg av fóðri skal til fyri hvørt kilo av øktari kropsvekt, samanborið við neyt er hetta 5-7 kg pr. 1 kg (GSI). Okkara lívfrøðiligi fóðurfaktor var við 1,17 kg enn lægri enn miðal í 2018. Vit savna okkum framhaldandi um at halda hesi tøl á einum lágum støði í 2019.

Aftrat hesum er proteinvarðveitslan í laksi tvær ferðir so høg sum í neytakjøti. Sum eitt tað mest effektivasta slagi av proteini viðmæla serfrøðingar aling sum eina burðardygga loysn til vaksandi eftirspurningin eftir proteini, treytað av at framleiðslan er ábyrgdarfull.

Hóast hetta viðurkenna vit á Bakkafrost, at vit mugu halda fram at gera stórar íløgur í at gera okkara framleiðslu effektiva, sum vit vaksa. Okkara mál er at minka okkara útlát í sambandi við framleiðslu tíggjufalt, og hetta hava vit megnað at fremja í nøkrum liðum í okkara virðisketu við at endurnýta orku (á okkara smoltstøðum, fóðurvirki og framleiðsluvirkjum), við at sameina virksemið við at arbeiða fyri ábyrgdarfullum atburði.

Tó hava nakrar avbjóðingar í lívfrøðitrygd havt við sær, at vit hava økt um útlátið á øðrum økjum í virðisketuni, eitt nú við nýggjum skipum til mekaniska avlúsing. Sum vit vaksa og okkara virðisketa somuleiðis veksur, vilja vit framhaldandi finna nýggjar hættir at skapa varandi orku (eitt nú á okkara nýggja biogassvirki) og taka effektivari tøkni í nýtslu (eitt nú á okkara smoltstøðum).

Aftrat ætlanum um at framleiða okkara egnu varandi orku vóna vit at megna at útvega okkum orku frá ymiskum uppruna, sum øll kann endurnýggjast. Okkara streymveitari, SEV, hevur kunngjørt ætlanir um at hava 100% grøna orku í 2030.

Vit rokna tillagingar til veðurlagsbroytingar upp í okkara langfreistaðu ætlanir fyri fyritøkuna.

Vit hava ment okkara leiðreglur fyri virkisábyrgd, sum greiðir frá okkara framferð í handfaring av umhvørvi, herundir orkunýtslu, dálking, burturkasti og handfaring av vatni. Hetta er at finna á www.bakkafrost.com/sustainability.

**Í 2018:**

- Útvegaðu vit okkum streym, har 48% kundi endurvinnast (tíverri var hetta 3% lægri enn í 2017).
- Bygdu vit nýggja smoltstøð, sum kann umskapa hita frá framleiðslu til orku, og kann henda orka nýtast til at reka og hita bygningin.
- Hildu vit fram at sambinda fóðurflakarnar í almenna elnetið og minkaðu harvið um oljunýtsluna til okkara alivirksemi.
- Betraðu vit um effektivitetin av framleiðsluni á okkara fóðurvirki og lækkaðu harvið um orkutørvin.

## LAKSAALING | $CO_2$ SLÓÐIN

Ein $CO_2$ slóð mátar samlaða útlátið av vakstrarhúsgassi, ið kemur beinleiðis og óbeinleiðis frá framleiðsluni av einari vøru.
$CO_2$ slóðin verður máld í kilo (kg) av koltvíiltu ekvivalent ($kgCO_2e$) fyri hvørt kilo av framleiðslu til matvørur



| Alilaksur | Høsnarungi | Grísur | Neyt | Seyður |
|---|---|---|---|---|
| 9.8 | 42.3 | 56.7 | 337.2 | Eingi tøl |

$CO_2$ útlát verður roknað við at falda útlátið av hvørjum einstøkum av teimum seks vakstrarhúsgassunum ($CO_2$, $CH_4$, N2O, HFCs, PFCs og SF6) við tess 100 ára “global warming potential” (GWP). Kelda: Global Salmon Initiative

Talvan yvirav gevur eitt yvirlit yvir orkunýtsluna og boð 1 og 2 útlát í okkara virksemi í Føroyum og fevnir sostatt um smoltstøðir, tøku, framleiðslu, pakking, fiskamjøl, lýsi og fóðurframleiðslu fyri 2018. Vit hava eitt 18-mánaða langt framleiðsluskeið, sum merkir, at har er ein óstøðugleiki í framleiðsluni. Hetta fer at ávirka okkara tilfar um umhvørvið, og tí síggja vit gongdina týðiligast við at hyggja yvir eitt 4-ára tíðarskeið. Okkara samlaða GHG útlát umfatar eisini fiskamjølið, lýsið og alifóðri, sum vit framleiða og selja øðrum alarum. Hetta skal sostatt havast í huga, tá ið vit samanbera hagtølini.

Sum væntað var ikki møguligt at fáa atgongd til orkukeldu á bryggjuni í 2018.

Hóast okkara samlaða fingramerki av carbon lækkaði í 2018 við 7%, hækkaði okkara carbon intensitetur pr. tons av framleiddum laksi. Hetta er orsakað av framhaldandi víðkan av okkara framleiðslu.

Í 2019 fara vit at arbeiða víðari við ætlanum um at skerja útlatið í tráð við veðurlagsvísundina. Sum liður í okkara menning av fóðurpolitikki vóna vit at samstarva við lykla áhugapartar (harumframt krøvum hjá altjóða góðkenningum) fyri at leggja nýggja vitan fram um tann burðardyggasta og effektivasta framferðarháttin at framleiða fóður. Haraftrat fara vit framhaldandi at økja um okkara orkueffektivitet, serliga í sambandi við okkara nýggju byggiverkætlanir.

## ORKUNÝTSLA

| Orkunýtsla | 2017 (kWt) | 2018 (kWt) | Broyting ár um ár |
|---|---|---|---|
| Beinleiðis orkunýtsla – karmur 1 | 264.671.752 | 242.687,948 | -8% |
| Beinleiðis orka (el) nýtsla – karmur 2 | 48.377.189 | 47.778.814 | -1% |
| **Samlað orkunýtsla** | **313.048.941** | **290.466.762** | **-7%** |

| GHG útlát | 2017 (TCO2e) | 2018 (TCO2e) | |
|---|---|---|---|
| Karmur 1 útlát | 69.826 | 64.217 | -8% |
| Karmur 2 útlát | 15.723 | 15.528 | -1% |
| Samlað orkunýtsla | 85.549 | 79.746 | -7% |

| | 2017 (Tons) | 2018 (Tons) | Broyting ár um ár |
|---|---|---|---|
| **Tons af tiknum laksi** | **54.615** | **44.591** | **-10.024** |
| Tons av $CO_2$e útláti pr. tons av framleiddum laksi: | 1.566 | 1.788 | 14% |

*Umfatar karm 1 og karm 2 útlát frá allari veitingarketuni hjá Bakkafrost; íroknað alla lýsi, fiskamjøl og alifóður framleiðslu á Havsbrún – ein partur av hesum verður seldur øðrum. Tølini fevna eisini um brennievni til bátar, ið verða leigaðir út til aðrar laksaalarar í Føroyum til avlúsing, umframt kryvjing av 4.200 tonsum av laksi fyri ein kappingarneyta.

- Elnýtsla (Karmur 2) førir til óbeinleiðis útlát, við tað at orkufelagið brennir fossil brennievni fyri at skapa orku. Beinleiðis útlát (Karmur 1) stendst av at brenna fossil brennievni, tvs. antin fast, flótandi ella gass til at hita, skapa framdrátt í skipum o.s.fr.
- Uppgerðin er gjørd við at nýta The Greenhouse Gas Protocol, a Corporate Accounting and Reporting Standard (dagførd útgáva)
- Valdi framferðarhátturin fyri útlát var virksemis eftirlit. Øll tøl eru beinleiðis nýtsla fyri hvørja vinnudeild faldað við einum orku umrokningarfaktori (har tað er hóskandi) og kolevnisútlátfaktori fyri hvørja nýtslueind.
- Ongar metingar eru gjørdar fyri vantandi ella ófullfíggjað tilfar í øllum virkseminum.
- Allir útláts og umrokningarfaktorar fyri beinleiðis útlát (Karmur 1) eru frá data frá DEFRA (UK) 2018, meðan útlátsfaktorar fyri elnýtslu eru grundaðir á tey nýggjastu hagtølini hjá SEV.
- Tons av Carbon Dioxide, ið svarar til (TCO2e), eru roknað út og endurgivin her, hetta ger so eina uppgerð av upphiting av jørðini potentialinum, sum hoyrir til hini týdningarmiklu vakstrarhúsgassini, sum verða sett í samband við fossil brennievni, umframt carbon dioxide ($CO_2$), tvs. metan ($CH_4$) og salpetur (nitrous oxide) ($N_2O$).
- Ein ætlað innanhýsismeting varð gjørd í 2018. Har varð gjørt vart við eitt smávegis mistak, har ein minni nøgd av tilfari um orku ikki var komið við. Vantandi tilfarið frá 2017 svarar til undir 0,5% av samlaðu kolevnisslóðini í 2017, og tí verður mett, at hetta ikki ávirkar kolevnisslóðina fyri tað árið stórvegis. Fyri at bøta um hetta, hevur Bakkafrost tikið stig til hert eftirlit á hesum øki í 2018.

# Sunt umhvørvi
# **Loysa okkara vøkstur frá árini á umhvørvið**

Í 2018 byrjaðu vit virksemi á okkara nýggju smoltstøð norðuri á Strond á Borðoynni. Nýggja støðin var sniðgivin at vera heimsins størsta smoltstøð og hevur smoltið upp til 500 gramm fyri at minka um tíðina á sjónum og betra um lívfrøðiligu trygdina.

Tann 22.000m² stóri bygningurin er við Haraldssund í einum gomlum grótbroti og var sniðgivin til liggja fjálgt við fjallið, so hann rennur saman við náttúrliga umhvørvinum.

Gagnnýtsla av vatni verður raðfest høgt á Strond, eftirsum at støðin fer at brúka upp til 120 mt/t. av feskvatni til 56 tangar, hvørs støddir eru frá 30m³ upp í 1200m³. Fyri at minka um tørvin á staðbundna vatninum hava vit samstarvað við kommununa á staðnum um at byggja eina vatnútveginarskipan, sum bygdin eisini kann njóta gott av. Haraftrat hava vit tikið nýggja útgerð í nýtslu, sum økir vatnumferðina til 99,7%. Henda framkomna biofilturskipanin er hin framkomnasta í Føroyum.

Smoltstøðin fer eisini at brúka sjógv til at stýra hitan av feskvatninum (brúkt í virkseminum), og vatnrenslið frá fjallinum við bygningin verður eisini nýtt.

Fyri at minka um útlátið av $CO_2$ hava vit tikið eina skipan í nýtslu, sum framleiðir ilt upp í 40% meira effektivt, samstundis sum tað nýtir helvtina av trýstinum. Aftrat hesum fara vit eisini at nýta hita frá framleiðslu til at reka og hita bygningin.

Ein slóðbrótandi skipan til burturkast fer at gera tað gjørligt at viðgera alt burturkastið, sum stendst av framleiðsluni. Tað verður síðan nýtt í okkara biogassvirki (sum verður virkið í 2020). Nýggi hátturin at handfara burturkastið verður tikin í nýtslu á tveimum støðum aftrat í 2019.

> „Vit gleða okkum at síggja støðina á Strond fullvirkna. Hendan fýra-ára verkætlanin hevur verið eitt samstarv millum fleiri partar og hevur notið gott av stóra áhuganum frá staðbundnu kommunumyndugleikunum, íkasti frá evnaríkum sniðgevum og tøkari serkønari arbeiðsmegi á staðnum.
> Vit gleða okkum til at dagføra hinar smoltstøðirnar við nakað av somu tøknini.“
>
> **Rúni Olsen,** Leiðari fyri aling á landi



Smoltstøðin á Strond
Mynd: Pól Sundskarð

# Sunn samfeløg
# **Frágreiðing um avrik**

### STRATEGISK RAÐFESTING

- At skapa virðir og styrkja sambandið við samfelagið

### 2020 TILSAGNIR

- Stovna ein nýggjan Sunt Lív grunn
- Innarbeiða samband við áhugapartar
- Seta nýggja samfelagsíløguætlan í verk

### 2018 AVRIK Í MUN TIL TILSAGNIR

- Fráboðaðu ein 10 millióna trý-ára Sunt Lív grunn ●
- Mentu eina ætlan at styrkja sambandið við áhugapartar ●
- Mentu og fóru undir at íverkseta eina nýggja virkisætlan fyri samfelagsíløgu ●

### 2019 FOKUS

- Halda áfram at seta nýggju ætlanina fyri samband við áhugapartar í verk
- Gera eina eftirmeting afturat um týðandi evni
- Økja íkastið til týðandi mál

### SDG MÁL

- SDG 8 Sømiligt arbeiði og búskaparvøkstur
- SDG 17 Samløg um málini

## HVÍ TAÐ HEVUR TÝDNING

Føroyski búskapurin er millum teir hægstu í heiminum, um tú hyggur at bruttotjóðarúrtøku pr. íbúgva, og talið meira enn tvífaldaðist millum 1998 og 2015. Føroyskur fiskiskapur og alivinna myndaðu 93% av samlaða vinnuútflutninginum. Atlantslaksur umboðar 45% av øllum útfluttum sjógæti, harav koma 33% frá Bakkafrost.

Talið av arbeiðstakarum í Føroyum er lutfalsliga millum tað hægstu í Evropa: 86% í november 2018. Bakkafrost er størsti arbeiðsgevari á privata marknaðinum og hevur 4% av øllum starvstakarum í starvi (desember 2018) og skapar harvið stórt virði gjøgnum lønir, lønarskatt og partafelagsskatt.

Síðan vit í 2010 vórðu skrásett á keypsskálanum í Oslo, hava vit økt okkara virði á partabrævinum við meira enn eitttúsund prosentum og skapt meira enn 1.639 mió kr. í (samtaks-, umsetnings- og útsettum) skattum.

Hóast vit eru ein lutfalsliga lítil fyritøka, merkir stóra virðið, vit skapa fyri Føroyar og víðari úti í heimi, at vit hava eina stóra ábyrgd fyri øllum, sum sýna okkara fyritøku áhuga; partaeigarum, starvsfólki og samfeløgunum á staðnum. Hóast vit eru skrásett og eru í kapping við nakrar av heimsins størstu multinationalu fyritøkum, eru vit framvegis í sera stóran mun ein staðbundin fyritøka við staðbundnum virksemi. Nógv síggja okkum sum ein part av gerandisdegnum í bygdarsamfelagnum, og tí mugu vit bera okkum at sum ábyrgdarfullir leiðarar og tæna teirra áhugamálum. Hetta inniber eisini at gera strategiskar íløgur í bygdarsamfelagið og stuðla mentanar- og ítróttarlívi á staðnum.

Gjøgnum tað virðið, sum vit skapa fyri føroyska samfelagið og gjøgnum okkara samstarvandi framferðarhátt sum fyritøka, geva vit í størri ella minni mun eitt íkast til at røkka ST mál 8 og 17 fyri burðardyggari menning. Sí síðu 9 fyri meira kunning.

## ÁBYRGDARFULL LEIÐSLA

At sýna leiðaraevni innan vinnuspurningar og ábyrgdarfullan vinnuligan borgaraskap merkir, at vit mugu gera meira enn at vera í samsvari og økja um okkara góðu ávirkan á samfelagið. Sum úrslit av evnistilgongdini, vit gjørdu í 2017, har vit eftirmettu okkara mest týðandi váðar og møguleikar innan burðardygd, gjørdist okkum greitt, at okkara áhugapartar (serliga í Føroyum) halda, at vit skulu skara framúr í ábygdarfullari leiðslu. Okkara leiðsla hevur verið sjónlig í altjóða høpi, tá ið tað snýr seg um vinnuspurningar við okkara íkasti til átøk so sum Global Salmon Initiative (GSI). Vit síggja samstundis, at vit hava møguleika at geva okkara førandi útinning av burðardygd og virðisøking størri ávirkan á lokalum stigi.



Sjómannadagur í Klaksvík 2018

**Í 2018:**

- Stovnaðu vit ein grunn á 10 mió kr., við denti á týðandi mál okkara, fyri at vísa okkara lyfti um at vísa ein leiðandi leiklut í vinnumálum. Grunnurin fevnir um ein trý-ára samlagssáttmála við Fróðskaparsetur Føroya fyri at økja kunnleikan um avbjóðingar innan burðardygd í Føroyum. Sí meira á síðu 34.
- Vórðu vit fyrsta fyritøkan í Føroyum, sum skrivaði undir tær 10 meginreglurnar hjá ST Global Compact, sum fevnir um menniskjarættindi, arbeiði, umhvørvi og anti mutur.
- Vóru vit í samráði við Føroya Landsstýri um ST málini um burðardygga menning.
- Góvu vit íkast til orðaskiftið um vinnuliga burðardygd, har umboðsfólk frá Bakkafrost tosaðu við eina røð av tiltøkum í Føroyum og úti í heimi.
- Komu vit á listan hjá Edie.net 2019 Sustainability Awards fyri okkara framferðarhátt at fáa ein grønan búskap.

„Bakkafrost hevur gjørt eina sera stóru íløgu í okkara kommunu við at byggja heimsins størstu smoltstøð. Verkætlanir av hesari støddini kunnu ikki annað enn hava ávirkan á staðbundnu samfeløgini. Gjøgnum tætt og framhaldandi samstarv hava vit funnið loysnir á avbjóðingum. Vit bjóða hesi samstarvssinnaðu framferðini vælkomnari, umframt teimum mongu ætlanunum um at tálma árinið á umhvørvið og økja um sína jaligu samfelagsligu ávirkan.“

**Heri Hammer,** Klaksvíkar Kommuna

Í 2019 fara vit at dagføra okkara leiðreglur fyri vinnuábyrgd, halda áfram at seta ábyrgdarfulla og burðardygga vinnu í verk og at hoyrast betur innan ávís mál (serliga í Føroyum) við at luttaka í tiltøkum og seta okkara dám á orðaskiftið um burðardygd.

### SAMFELAGSÁHUGI OG GJØGNUMSKYGNI

Okkara støða í Føroyum ger tað enn meira umráðandi, at samfelagið merkir, at vit lurta eftir teimum, tá ið tað snýr seg um viðurskiftir, sum samfelagið leggur dent á.

Tey seinastu árini hava vit tikið stór stig í okkara effektivu vakstrarætlan. Ein liður í hesum hevur verið nýggjar byggiverkætlanir um oyggjarnar, sum fara at hava árin á arbeiðsmarknaðin á staðnum, men eisini á umhvørvið.

Hóast vit altíð arbeiða sambært reglum ásettar av lokalum myndugleikum og hava regluligt samskifti við umboðsfólk á staðnum (so sum kommunurnar), vísir okkara evnisgreining frá 2017, at okkara sýndi áhugi fyri lokalum viðurskiftum kundi verið størri. Vit hava svarað við nærri ráðgeving um ávísar verkætlanir og meira opinleika um okkara hugburð um burðardygd og íløgur í samfelagið.

Vit hava eisini økt um samskiftið og gjøgnumskygnið við samfelagið, sum vit hava gjørt íløgu í, um viðurskifti um burðardygd, herundir nærri samstarv við ábyrgdarfullar útvegarar av íløgutænastum.

**Í 2018:**

- Øktu vit um gjøgnumskygnið um mál innan týðandi burðardygd við at prenta okkara fyrstu frásøgn um burðardygd.
- Mentu vit og settu skjótil á ætlanina um betri skipað samstarv við áhugapartar. Hetta førdi við sær, at vit gjørdust varug við eina røð av staðbundnum áhugapørtum, sum vit skulu hitta í 2019.
- Øktu vit um samstarvið við staðbundnar kommunur, íleggjarar, viðskiftafólk og eftirlitsfólk í viðurskiftum um burðardygd.
- Samstarvaðu vit við sjónvarpið við at kanna umhvørvisligu árinini av laksaaling. Tað var øktur áhugi fyri hesum evni í Føroyum í 2018.
- Gjøgnumførdu vit eina nágreiniliga kanning av umhvørvisávirkanini hjá okkara komandi biogassvirki. Næsta stigið er eitt alment samráð í 2019.

Sum liður í áhugaætlan okkara fyri áhugapartar í 2019 er ætlanin at økja áhugan um burðardygd við fundum við staðbundnar áhugapartar, har teir hava høvi at koma við teirra íkasti.

Vit ætla eisini at gera eina eftirmeting um týðandi mál, har vit aftur fara at biðja áhugapartarnar um at meta, hvussu avrik okkara er innan øki, sum eru teirra hjartamál.

## VIRÐISSKAPAN Á STAÐNUM

Vit skapa lokalan framburð gjøgnum skatt, starvssetanir og við at gera íløgur í samfelagið á staðnum. Bakkafrost er ein sameining av fleiri alarum, sum gjøgnum árini hava verið sera týdningarmiklir fyri, at lokalsamfeløgini hava yvirlivað. Góð handfaring av okkara váðum og møguleikum hevur verið umráðandi fyri at varðveita eina sunna fyritøku og harvið gera samfelagið kring okkum sunnari. Síðan vit vórðu skrásett, er tað vorðið alsamt meira týdningarmikið fyri okkum at hava javnvág millum avkast til partaeigarar og íløgur í samfeløgini á staðnum. Í 2018 dagførdu vit okkara íløgupolitikk í samfelagið, so hann nú eisini fevnir um lokal átøk, sum vit meta vera av serligum týdningi.

Íverksetanin av okkara nýggja politikki fer at fevna um tvinnar hættir av íløgum grundað á dagførdar meginreglur: Vit fara at nøkta lokalan tørv við at svara umbønum á alnótini og við at gera proaktivar íløgur í útbúgving, gransking og nýhugsan, umframt at stuðla føroyskum ítróttartiltøkum, list og mentan.

Skatturin, sum vit rinda, er tann størsti í Føroyum. Sambært in.fo rindaði Bakkafrost tað sama í skatti til staðbundin samfeløg, sum Føroyar fingu frá danska statinum.

Vit geva eisini eitt stórt íkast gjøgnum tær vørur og tænastur, sum vit útvega fyri at reka fyritøkuna. Í 2018 vóru 72% av okkara veitarum føroyskir, og tey írestandi 28% stavaðu fyrst og fremst úr Danmark, Noregi, Íslandi og øðrum londum í Evropa. Hesir umfataðu veitarar av tilfari til okkara fóður, skip, tøkni, ið verður nýtt til framleiðslu á okkara alistøðum, smoltstøðum og framleiðsluvirkjum, bygging og olja og orka, sum varð nýtt til okkara virksemi. Í 2018 stóðu umleið 20 veitarar fyri 50% av samlaðu peninganýtsluni.

**Í 2018:**

- Hava vit goldið yvir 341 mió kr. í lønum og starvsfólkakostnaði.
- Hava vit goldið 297,5 mió kr. í partafelagsskatti og umsetningsskatti.
- Hava vit útvegað 72% av okkara vørum og tænastum lokalt.
- Hava vit hildið fram við okkara óbeinleiðis íkasti til búskapin, og einans í sambandi við bygging góvu vit umleið 200 fólkum arbeiði.
- Góvu vit eitt íkast á 1,9 mió kr. til lokal endamál, eitt nú ítrótt, list og mentan og sosialt arbeiði.
- Skipaðu vit fyri og stuðlaðu einari røð av tiltøkum, herundir Sjómannadegnum og fjørurudding.
- Stovnaðu vit ein nýggjan grunn á 10 mió kr. og dagførdu okkara politikk um íløgur í samfelagið, umframt okkara langtíðarstamstarv um umráðandi mál innan burðardygd.

Í 2019 fara vit at økja stuðulin til mál, sum vit leggja stóran dent á, sum eru íkomin av langtíðar samløgum, eitt nú okkara trý-ára samstarv við Fróðskaparsetur Føroya. Vit fara eisini at økja gjøgnumskygnið við peninganýtsluna, sum vit brúka til okkara samfeløg fyri at vísa, hvussu vit nýta okkara dagførda politikk.



Sigurð í Jákupsstovu og Regin Jacobsen

**Stuðul**




- 87% Føroyskur ítróttur
- 5% Føroysk list og mentan
- 6% Annað lokalt (íroknað útbúgving, umhvørvismál, sosial umfevning)
- 3% Hjálp uttanlanda



# Sunn samfeløg
# **Ein tilsøgn um at stuðla natúrliga heimi okkara**

Í 2018 hátíðarhildu vit okkara 50-ára føðingardag við eini tilsøgn um at gera íløgur á 10 mió kr. yvir eitt trý-ára skeið í ein nýggjan Sunt Lív grunn.

Fráboðanin fevnir um ein trý-ára samlagssáttmála við Fróðskaparsetur Føroya á 2,1 mió kr., at skunda undir kanningar innan náttúruvísindi við tí endamáli at finna loysnir á avbjóðingum, sum havbúnaðarvinnan stendur yvirfyri um allan heim.

Samstarvið við Fróðskaparsetrið hevur sum endamál at økja um okkara vitan um ávirkanina av aling á firðirnar og møgulig árin av veðurlagsbroytingunum á laksaaling í Føroyum. Fiskaheilsa, -trivnaður og lívfrøðitrygd verður eisini partur av granskingini.

Nýggi grunnurin er liður í okkara Sunt Lív verkætlan, sum hevur til endamáls at kanna okkara fíggjarligu, sosialu og umhvørvisligu árin. Alivinnan spælir ein stóran leiklut í sambandi við at nøkta heimstørvin eftir proteini, men stóra avbjóðingin er at gera tað á burðardyggan hátt.

Við at gera reglur fyri okkara samfelagsíløgur, so vit stuðla okkara týdningarmestu málum, og við at byggja langtíðarsambond við aðrar felagsskapir, vóna vit at uppbyggja ein ábyrgdarfullari hugburð til laksaaling í Føroyum.

> „Fíggingin fer at gera tað gjørligt hjá Setrinum at menna sínar førleikar á hesum øki og í longdini fáa meira fígging, sum kann uppbyggja eitt vitanarfeingi í Føroyum, sum í longdini fer at gagna vinnuni.“
>
> **Sigurð í Jákupsstovu**, Rektari

# Um frágreiðingina

Í 2017 gjørdu vit eina kanning av týðandi evnum, har vit eftirmettu okkara mest týðandi fíggjarligu, sosialu og umhvørvisligu váðar og møguleikar. Kanningin fevndi um ymisk stig av skriviborðskanningum; ein leiðslubólkur metti um mál, sum høvdu størstu virksemis, fíggjarligu og umdømisárinini; og ráðlegging við ein umboðandi bólk av uttanhýsis áhugapørtum (valdir av forstjóranum og leiðslubólkinum, grundað á teirra áhuga í fyritøkuni). Vit høvdu samrøður við áhugapartar, sum umboðaðu ymiskar bólkar íroknað yrkisfeløg, starvsfólk, íleggjarar, viðskiftafólk, veitarar, samfelagsumboð, føroysk eftirlitsfólk, NGO-arar og serfrøðingar í burðardygd. Vit tosaðu við minst tvey umboðsfólk úr hvørjum bólki, sum eftir at útfylla spurnarblað á alnótini og við samrøðum hjálptu okkum at fáa eyga á og raðfesta umráðandi mál.

Hetta arbeiðið førdi til ein lista við 20 evnum (sí síðu 36), sum hava skapað grundarlagið undir hesi frásøgnini og okkara Sunt Lív ætlan. Vit hava givið tilsøgn um at arbeiða við evnum, sum eru mett at hava størsta árinið á fyritøkuna, og sum áhugapartarnir meta vera mest áhugaverd. Øll hesi mál fara kortini at vera liður í okkara fyrisitingarætlanum og hava indikatorar, sum vit fara at greiða frá árliga. Ábyrgdarfull leiðsla og kundanøgdsemi stungu seg upp sum „nýggj“ týðandi evni, og samfelagsligur áhugi og gjøgnumskygni kom fram sum eitt øki, har Bakkafrost kundi gerast betri (lutvíst orsakað av avmarkaðari frásøgn um burðardygd og íløgur í staðbundnu samfeløgini).

Í 2018 eftirmettu vit hesi málini tilvildarliga (sí síðu 38) og við skriviborðskanningum (íroknað eina fjølmiðlakanning). Burturkast og pakkitilfar komu eisini fram sum týdningarmikil viðurskifti, og umhugsa vit at gera hesi evni til part av okkara tilsøgn at gera eina frágreiðing um okkara pakkitilfar í 2019.

Vit fara at gera enn eina nágreiniliga áseting í 2019.



Bakkafrost, Glyvrar

**Handfaring og stýring av burðardygd**
Burðardygd er ábyrgdin hjá leiðslubólkinum, sum regluliga er í sambandi við stjóran. Handfaringin og stýringin av hesum eru mál, sum viðkoma nevndini í Bakkafrost, og verður løgd fram minst tvær ferðir um árið, umframt á árliga aðalfundinum. Nevndin gav sítt íkast til og góðkendi reglugerðina og mannagongdina fyri 2017 og frágreiðingina um burðardygd og fer eisini at samtykkja frásøgnina fyri 2018. Í 2018 umrøddi nevndin burðardygd í fýra førum.

Leiðslubólkurin metir um framgongdina og avrikini í Sunt Lív ætlanini hvønn ársfjórðing við eini stigmeting. Meðan vit fyrireika okkum til næsta stigið á leiðini, fer bólkurin haraftrat at meta um mannagongdirnar í øllum teimum týðandi málum, sum eru nevnd í hesi frásøgnini, í 2019. Nýggjar ætlanir verða givnar stýrinum til góðkenningar og fara eisini at umfevna innlit frá uttanhýsis áhugapørtum og aftursvar savnað inn frá ESG metingum.

Kjarnuvirðini hjá Bakkafrost leggja dent á endamálið at bera seg ábyrgdarfult at. Hetta fevnir eisini um at hugsa fram í tíðina á búskaparligu, sosialu og umhvørvisligu økjunum. Vit fylgja einum hugburði við fyriliti til stýring av váðum í sambandi við burðardygd við at gera eina árliga meting av váðanum, sum er við í ársfrásøgnini frá 2018 og frameftir. Mannagongdin útlutar ábyrgd til avmarking av týðandi virksemisváðum.

Vit hava eftirlit við øllum váðum í øllum Bakkafrost samtakinum og í allari virðisketuni, og innanhýsis frágreiðingar verða regluliga gjørdar, og árliga verður frágreiðing gjørd av ytru pørtum um serstakar váðar í burðardygd.

Leiðreglur okkara fyri atferð greiða eisini frá okkara endamáli um at „stremba eftir at vera á odda í vinnuni í verju av umhvørvinum. Kravt verður av øllum starvsfólkum, at tey hugsa um ávirkanina á umhvørvið, sum virksemið knýtt at arbeiðinum hevur á náttúruna og umhvørvið og at nýta umhvørvisvinarligar loysnir so langt skynsamliga møguligt.“

Meira kunning um framferðarháttin hjá Bakkafrost innan leiðslu og virðir, meginreglur og atburð, eru at finna undir okkara leiðreglum fyri virkisábyrgd.

# Týðandi evnir í burðardygd




**Viðmerking um frágreiðingina**

Um annað ikki stendur undir „meira kunning“ í okkara GRI indeksi, er markið fyri frásøgnina alt virksemið hjá Bakkafrost í Føroyum. Nýggja dótturfelagið í USA, sum vit ognaðu okkum miðskeiðis í 2018, og lítla søluskrivstovan í Stórabretlandi eru ikki við.

Vit hava kortlagt tey týðandi málini, sum okkara áhugapartar hava gjørt vart við mótvegis GRI Standardunum, og kunningin í hesi frásøgnini er gjørd til at viðgera GRI Standard evnini eitt fyri og annað eftir. Henda frágreiðing er gjørd í samsvari við GRI Standardirnar: Kjarnuloysnir við leiðbeining frá okkara ráðgeva innan burðardygd, Salterbaxter. Talva er á síðu 39.

Tað er eingin endurtøka av upplýsingum í hesi frásøgn. Grundarlagið undir frásøgnini um starvsfólkatilfar sæst á www.bakkafrost.com/sustainability

Bert indikatorarnir, sum eru fráboðaðir til Global Salmon Initiative, eru grannskoðaðir av triðjaparti – løggilda grannskoðanarvirkinum Januar.

### Sunn vinna

- **Stjórnarreglugerðir og samsvar:** Evnið at møta økjandi eftirspurningi gjøgnum skipaðan vøkstur og í samsvari við viðkomandi lógir, reglugerðir og við lokalum og altjóða standardum.
- **Siðfrøðilig atferð:** At varðveita góðan handilssið um alla virðisketuna sambært virðunum og meginreglunum hjá Bakkafrost.
- **Kundanøgdsemi:** At lurta eftir kundum og møta broytandi kundatørvum og standardum.
- **Nýhugsan:** Gera íløgur í nýhugsan og menning, at nøkta skiftandi kundatørvi, fáa fyrimunir av møguleikum og reka førandi standardir í burðardygd.
- **Altjóða viðurskifti:** At stýra ávirkan á vørumerki frá altjóða spurningum og viðurskiftum.

### Sunn fólk

- **Menniskjaligt fæfeingi:** Førleikin at draga gávað fólk at sær og varðveita tey, menna starvsfólkaførleikar, varðveita høgan áhuga hjá starvsfólki gjøgnum arbeiðsgleði og samtykt við fyritøkuvirðir.
- **Heilsa, trygd og trivnaður:** At varðveita eitt høgt støði av arbeiðsheilsu og trygd, og skapa eina heilsugóða arbeiðsmentan.

### Sunnur laksur

- **Vørugóðska:** At varðveita høga vørugóðsku, uttan dálkandi evni frá evnavørum, meðan vit útvega føðsluríkt, effektivt og burðardygt djóraprotein.
- **Fiskaheilsa og trivnaður:** Varðveita førandi trivnaðarstøði og avmarka nýtsluna av evnavørum og heilivági í fyribyrgjan av sjúku og lús.
- **Lívfrøðitrygd:** Fyribyrgja at laksur sleppur, og at sjúka og lús spjaðir seg frá alifiski til villan fisk.
- **Samstarv og góðkenning:** Samstarva fyri at taka sær av skipaðum avbjóðingum í burðardygd gjøgnum uttanhýsis standardir og góðkenning.

### Sunt umhvørvi

- **Lokal dálking:** Avmarka dálkingina av lokala umhvørvinum í øllum liðum av virðisketuni (íroknað innvølir marint støv, vatndálking, óljóð og luftdálking) og gera íløgur í umhvørvisátøk.
- **Burðardygt alifóður:** Burðardygga og ábyrgdarfulla framleiðslu av fiskamjøli, lýsi og alifóðri, umframt útvegan av rávøru og stýring av fiskastovnum.
- **Burturkast og pakkitilfar:** Minka um og skerja umhvørvisárinið av burturkasti frá framleiðsluringrásini, bæði mat og pakkitilfar.
- **Vatn:** Effektiva feskvatnsnýtslu í øllum liðum í virðisketuni og gera íløgur í nýggja tøkni fyri at tálma nýtsluni.
- **Veðurlagsbroytingar:** Avmarka GHG útlát í allari virðisketuni og gera nakað við váðan av veðurlagsbroytingunum
- **Orka:** Munagóða orkunýtslu og førleika at útvega orku frá varandi orkukeldum (umtalað undir veðurlagsbroytingum í frásøgnini).

### Sunn samfeløg

- **Ábyrgdarfull leiðsla:** Vísa leiðaraevni í vinniligum viðurskiftum, umframt ábyrgdarfullan virkisborgaraskap.
- **Samfelagsvirkni og gjøgnumskygni:** Sýna áhuga fyri lokala samfelagnum og virka fyri gjøgnumskygni í týðandi viðurskiftum.
- **Lokal virðisøking:** Skapa virðir í lokalum samfeløgum gjøgnum skatt, íløgur í samfeløgini og útvega arbeiðspláss um allar Føroyar.

# Luttøka hjá áhugapørtum

Bakkafrost er tilvildarliga og tilætlað í sambandi við ymiskar áhugapartar við ymiskum áhugamálum.

Í 2017 var týdningarmesta luttøkan hjá áhugapørtum ásetingin í sambandi við at eyðmerkja mest týðandi viðurskiftini í burðardygd fyri fyritøkuna (les meira á síðu 36). Vit nýttu úrslitini til at menna Sunt Lív ætlanina um burðardygd, sum vit fara at nýta til at svara tørvinum og áhugamálunum hjá áhugapørtum.

Í 2018 gjørdu vit eina kortlegging av áhugapørtum, fyri at menna eina luttøkuætlan, sum gav okkum eina meira skipaða tilgongd og økti um møguleikarnar hjá áhugapørtum at koma við afturboðan. Bólkar av áhugapørtum vóru kosnir av stjóranum, leiðandi innan burðardygd og leiðslubólkinum, og vóru øll mett at vera týðiliga hugtikin av okkara virksemi, ella at hava førleikan at ávirka væleydnaða raksturin av fyritøkuni, og hvussu vit útinna okkara ætlan.

Vit fara at halda fram at seta okkara ætlan í verk í 2019, eitt nú við tøttum samstarvi við at luttaka ein og ein við okkara forstjóra.



Kundastevnan á 50-ára haldinum hjá Bakkafrost

| Bólkur | Slag av sambandi | Upprit frá sambandi |
|---|---|---|
| **Arbeiðsfólk og fakfeløg** | Regluligt samband og støðugir fundir við fakfeløg<br>Regluligir arbeiðara arbeiðsbólkafundir<br>Annaðhvørt ár verða týðandi viðurskifti í burðardygd eyðmerkt | Høvuðsevni: arbeiðsumstøður, samsýning, heilsa og trygd, fólka fæfeingi.<br>Eftir at hava hoyrt frá arbeiðsfólki gjøgnum fakfeløg tók Bakkafrost í 2018 stig til at betra um samskiftið millum leiðslu og arbeiðsfólk. |
| **Kundar** | Annaðhvørt ár verða týðandi viðurskifti í burðardygd eyðmerkt<br>Annaðhvørt ár verður skipað fyri kundastevnu (sum allir kundar eru bodnir við til)<br>Árligt spurnarblað á alnótini<br>Árligt samband á sølustevnum, íroknað: Seafood Expo North America (Boston), Seafood Global (Brússel), China Fisheries & Seafood Expo (Qingdao), WorldFood (Moskva)<br>Árligt samband á kundastevnum | Høvuðsevni: Góðkenning, góðska, nøgdsemi, altjóða viðurskifti, pakkitilfar, vørumenning.<br>Í 2018 byrjaði Bakkafrost við feskum portiónum sum úrslit av aftursvari frá kunda<br>Í 2018 vóru kundar áhugaðir í okkara fóðurpolitikki og frágreiðing um pakkitilfar. |
| **Veitarar** | Annaðhvørt ár verða týðandi viðurskifti í burðardygd eyðmerkt<br>Støðugt samband | Høvuðsevni: Góðkenning, góðska, fyritøku standardir (íroknað mannarættindi, heilsa og trygd og umhvørvis standardir). |
| **Lands- og eftirlits-myndugleikar** | Regluligt og støðugt samband | Høvuðsevni: Loyvir og skráseting, fiskaheilsa og trivnaður, dálking, etisk atferð, altjóða viðurskifti, málini hjá ST fyri burðardyggari menning |
| **Staðbundin samfeløg** | Annaðhvørt ár verða týðandi viðurskifti í burðardygd eyðmerkt<br>Støðugt samband við kommunumyndugleikar, havnameistarar og áhugafeløg<br>Luttøka á vinnutiltøkum saman við føroyska vinnulívinum av og á | Høvuðsevni: Nýggjar byggiverkætlanir, íløgur í staðbundna samfelagið, burturkast, vatn, dálking, virðisskapan.<br>Í 2018 tóku vit lut í eini dokumentarsending um árinið av laksaaling. Vit hava økt gjøgnumskygnið um hugburðin hjá leiðsluni til dálking í hesi frásøgnini. |
| **Íleggjarar** | Framløga fyri íleggjarar hvønn ársfjórðing og regluligt samband<br>Capital Markets Dagur (sum allir íleggjarar eru bodnir við til)<br>Árligt samband um íleggjara ESG meting<br>Annaðhvørt ár verða týðandi viðurskifti í burðardygd eyðmerkt<br>Reglulig vitjan av íleggjarum | Høvuðsevni: Gjøgnumskygni um øll týðandi mál.<br>Bakkafrost hevur økt um gjøgnumskygnið á øllum týðandi málum við síni fyrstu frágreiðing um burðardygd í 2017 og økti enn meira um gjøgnumskygnið við at fylkja hesa frásøgnina í tráð við GRI Standardin.<br>Í 2018 økti Bakkafrost sambandið við íleggjarar um ESG viðurskifti |
| **NGO-arar** | Annaðhvørt ár verða týðandi viðurskifti í burðardygd eyðmerkt | Høvuðsevni: Dálking, fiskaheilsa og trivnaður, samband við staðbundna samfelagið |
| **Góðkenningar-stovnar** | Áhaldandi samband við triðjaparts góðkenningarstovnar, íroknað ASC, MSC og GLOBALG.A.P.<br>Annaðhvørt ár verða týðandi viðurskifti í burðardygd eyðmerkt | Høvuðsevni: Góðkenning, góðska (íroknað matvørutrygd), heilsa og trygd |
| **Vinnubólkar** | Áhaldandi samband við bólkar, íroknað Arbeiðseftirlitið, Sjóvinnustýrið, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Havbúnaðarfelagið, Global Salmon Initiative (GSI)<br>Annaðhvørt ár verða týðandi viðurskifti í burðardygd eyðmerkt | Høvuðsevni: Fiskaheilsa og trivnaður, mannarættindi, nýhugsan, samstarv og góðkenning, altjóða viðurskifti, heilsa og trygd, dálking, fóður, gjøgnumskygni |
| **Vinnuserfrøðingar og akademikarar** | Framhaldandi samband við uttanhýsis djóralæknar<br>Annaðhvørt ár verða týðandi viðurskifti í burðardygd eyðmerkt<br>Venjing í burðardygd undir leiðslu av serfrøðingum | Høvuðsevni: Øll týðandi mál |

## Sjálvboðin limaskapur

Bakkafrost tekur lut í ST Global Compact og er limur í the Business Action Platform for the Ocean.

Gjøgnum hendan virkispallin miða vit ímóti at geva okkara íkast til eitt sunt hav, gjøgnum vøkstur, nýhugsan og burðardygd.

Bakkafrost er stovnandi limur í hesum átaki, sum arbeiðir fyri at fremja burðardygga havbúnaðarleiðslu gjøgnum samstarv.

Havsbrún er stovnandi limur í hesum átaki, sum tryggjar eina forvirkna støðu fyri økið framman fyri ES kommissiónini, umboðsráðnum og tinginum, og veitir nágreiniligar upplýsingar til tey, sum taka avgerðirnar.

Bakkafrost spældi ein týðandi leiklut í stovnanini av Havbúnaðarfelagnum, sum virkar fyri einum felags hugburði til handfaringina av burðardyggum spurningum, sum havbúnaðarvinnan í Føroyum stendur yvirfyri.

## Styrkitøl:

SUSTAINALYTICS — Bakkafrost hevur metingina 58

MSCI — Bakkafrost hevur metingina BB

FAIRR — Bakkafrost hevur eina meting á 78%

Sí heimasíður okkara, har ein umfatandi listi er yvir limaskapir og feløg.
Meira kunning um nøkur av hesum tiltøkunum, samfelags-luttøku og økir, har vit øktu um sambond og luttøku í 2018, er á síðu 32. Sí síðu 11 fyri at lesa um, hvussu starvsfólk taka lut í serstøkum málum.
Afturboðan um hesa frásøgn, ella um onnur týðandi búskaparlig, umhvørvislig og sosial mál viðvíkjandi Bakkafrost, skulu sendast til bakkafrost@bakkafrost.com. Hesi verða síðan latin nevndini fyri Burðardygd hjá Bakkafrost.



„Vit hava flutt okkum út um tað trygga, ikki bara fyri okkara fyritøku, men fyri alt tað føroyska samfelagið. Vit fara at skapa vøkstur, ikka bara her á staðnum, men fyri alt samfelagið.“

**Hans Jacobsen, sáli, best kendur sum Hans á Bakka**
Stovnari av Bakkafrost

Bakkafrost P/F • Bakkavegur 9 • PO Box 221 • FO-625 Glyvrar
Tel +298 40 50 00 • Fax +298 40 50 09 • bakkafrost@bakkafrost.com • www.bakkafrost.com